# GERÐABÓK

**Dato:** 29. februar 2024 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 25/24 – 47/24**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Bjørg Dam
Jákup Dam
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Turið Horn
Jón Kragesteen
Birita Baldvinsdóttir Iversen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Bogi Jacobsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 95<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 25/24 | 24/01158-1 | Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 29. februar 2024 | 97 |
| 26/24 | 24/00958-2 | Súna Mørk berst frá at møta á býráðsfundi 29. februar 2024 | 98 |
| 27/24 | 24/00063-1 | Mál beind í nevndir 2024 | 99 |
| 28/24 | 23/04838-5 | Matr.nr. 91n, Kollafjørður. Eigari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa. | 100 |
| 29/24 | 24/00456-5 | Matr.nr. 255eb, Kirkjubøur,Argir. Eigari letur óbygda grundstykkið innaftur. | 102 |
| 30/24 | 24/00576-2 | MEGD, hevur sent kommununi umsókn um leinging av verandi leigumáli. Matr.nr. 910æ, Tórshavn. | 104 |
| 31/24 | 20/04153-1 | Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár | 106 |
| 32/24 | 22/00894-1 | Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla | 108 |
| 33/24 | 21/00499-1 | Nýggj høli til frítíðarskúlan í Kollafirði, Úthangið og Kura | 119 |
| 34/24 | 20/01962-1 | Verkløg við Hoyvíksvøll | 129 |
| 35/24 | 23/07326-1 | Heildarætlan fyri Vestaru bryggju | 137 |
| 36/24 | 23/03633-4 | Umsókn til keyp av øki - víðka grundstykki á Tórgarðsgøta 38, matr. nr. 690m, Tórshavn | 140 |
| 37/24 | 20/03903-8 | Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum | 142 |
| 38/24 | 24/00711-1 | Vegaatkoma til 72A og 72B við Marknagilsvegin - Vegur 4 og 5 á matr. nr. 1216a | 147 |
| 39/24 | 21/02196-2 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK | 149 |
| 40/24 | 22/01377-1 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | 161 |
| 41/24 | 24/00237-1 | Broyting av almennu byggisamtyktini, matr. nr. 1156, 1157 og 1160a, Tórshavn. Frá 4. grundumráði til D2 | 168 |
| 42/24 | 21/03297-2 | LV mál nr. 21/01631 (VS: mál nr. 16/00514 Viðv. leigusáttmálanum á matr. nr. 1e og 1f á Sundi) | 170 |
| 43/24 | 24/00634-1 | Verjugarður við Vónina - broyting | 176 |
| 44/24 | 21/02574-1 | Leigusáttmáli Smyril Line | 178 |
| 45/24 | 24/00785-1 | Prísir á tyrvitilfari í sambandi við Nýggjheiðar | 182 |
| 46/24 | 24/00061-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024 | 185 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 47/24 | 24/00058-1 | Kunning/fráboðanir í 2024 til býráðið | 187 |

**Til viðgerðar**

## 25/24 Gunvør Balle berst frá at møta á býráðsfundi 29. februar 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 25/24 | 24/01158-1 |

**Málslýsing**
Gunvør Balle hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jón Kragesteen, eru loknar.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Tikið til eftirtektar.

# 26/24 Súna Mørk berst frá at møta á býráðsfundi 29. februar 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 26/24 | 24/00958-2 |

**Málslýsing:**
Súna Mørk hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Birita Baldvinsdóttir Iversen, eru loknar.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Tikið til eftirtektar.

# 27/24 Mál beind í nevndir 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 3/24 | 24/00063-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 27/24 | 24/00063-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 28/24 Matr.nr. 91n, Kollafjørður. Eigari ynskir at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 35/24 | 23/04838-5 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 28/24 | 23/04838-5 |

**Upprunin til málið.** Óbygt grundstykki. Byggifreistin er farin, og er eigari sinnaður til at lata grundstykkið innaftur til kommununa.

**Lýsing av málinum**

Matr.nr. 91n, Kollafjørður. ( Í útstykking á Hamrabøi )
Vídd 563m². Grundstykkið er ógrivið.
Søluprísur 264.615,63
Skeytið er tinglýst 15.11.2018

Byggingin skal vera byrja innan 2 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Byggingin skal vera liðug og byggiváttan útskrivað í seinasta lagið 3 ár frá tí, at byggibúningin er liðug og klárt er at byggja á stykkinum. Annars tilskilar kommunan sær rætt til at krevja stykkið aftur móti, at keyparin fær keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.
Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglu fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. K**ortskjal. Tinglýst skeyti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | Býráðsfundur<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 101<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6175 | | Keyp og søla | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 264.615,63 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan sølupris kr. 264.615,63 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Peningurin verður játtaður av konto 6175, keyp og søla.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 102<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 29/24 Matr.nr. 255eb, Kirkjubøur,Argir. Eigari letur óbygda grundstykkið innaftur.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 36/24 | 24/00456-5 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 29/24 | 24/00456-5 |

**Upprunin til málið.**

Eigari av grundstykkinum, heitir á kommununa um at keypa grundstykkið aftur.

**Lýsing av málinum.**

Matr.nr. 255eb, Kirkjubøur, Argir. Skeytið tinglýst 09.03.2021. Kr. 627.816,00
Byggifreist 09.03.2024

**Lógir, ásetingar o.a.**

Sambært skeytisásetingum, skal verandi eigari rinda fyri tinglýsing av afturkeyps skeytinum, og verður kommunan hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Kort.** J.nr. 24-00456 – 4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐

| | **Býráðsfundur**<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 103<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | Keyp og søla. |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 627.816,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndini, at keypa grundstykkið aftur fyri uppruna søluprís kr. 627.816,00

Tá ið kommunan er vorðin tinglýstur eigari av stykkinum, verður stykkið útlutað sambært reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús, samtykt á býráðsfundi 24. Februar 2022

Verandi eigari rindar fyri tinglýsing av afturkeyps skeytinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 30/24 MEGD, hevur sent kommununi umsókn um leinging av verandi leigumáli. Matr.nr. 910æ, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 37/24 | 24/00576-2 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 30/24 | 24/00576-2 |

**Upprunin til málið.** Umsókn frá MEGD.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 910æ, Tórshavn. Jøkulstræti 3. Kommunan leigur matr.nr. 910æ, Jøkulstræti 3, út til MEGD har felagið hevur bygt ein bygning til felagsins virksemi.

Áseting § 1.
Leigumálið tekur við tann 1. oktober 1993 og stendur við óuppsigiligt av báðum pørtum til 1. oktober 2023, tá tað heldur uppat uttan serliga uppsøgn.

Áseting § 3.
Leigan er 2. kr. pr.m² leigað øki pr. ár.
Vídd á grundstykkin er 844m² og verður útroknað árlig leiga kr. 1.688,-

Áseting § 4.
Tá ið leigumálið gongur út, hevur býráðið rætt til at gerast eigari av bygninginum, ið reistur er á økinum, fyri tað, hann verður mettur til. Virðismetingin verður gjørd av 3. óvildugum monnum tilnevndir av Føroya rætti. Ynskir býráðið ikki at yvirtaka bygningin, kann býráðið krevja, at leigarin letur tað leigaða økið frá sær í sama standi, sum hann tók við tí og ruddað fyri alt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Tinglýstur leigusáttmáli. Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at framleingja leigumálið

Verandi § 1, gongur út.

Nýggj § 1, verður soljóðandi.
Leigumálið verður longt frá 1. oktober 2023 og stendur við
óuppsigiligt av báðum pørtum til 1. oktober 2033, tá tað heldur uppat uttan serliga uppsøgn.
Leigusáttmálin verður annars óbroyttur galdandi í øllum orðum og setningum tess.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 31/24 Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 14.01.2021 | 11/21 | 20/04153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.05.2022 | 112/22 | 20/04153-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 31/24 | 20/04153-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.

Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

Í nevndini sita: Vivi Kirke Davidsen, Kári Mortensen, Edith Vang, Torvald Lützen, Heri Ó. Dam. Varalimir: Fróði Olsen, Leivur Hansen, Jóannes Guttesen, Anna Rubeksen, Karlon Winther.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nevndarlimir í nevndina, umframt tiltakslimir.

**Býráðsfundur 14. januar 2021: Vald vórðu:**

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Thorvald Lútzen | Anna Rubeksen |
| Bergur Dam Jensen | Heri Dam |
| Bjartur Brekkstein | Niels á Reynatúgvú |
| Karlot Hergeirsson | Rúni S. Patursson |
| Dánjal Hansen | Fróði Olsen |

**Ískoyti:**
Á býráðsfundi 14. januar 2021 varð Thorvald Lützen valdur í hegn- og vatnsýnisnevndina, og varð Anna Rubeksen vald sum varalimur í nevndina. Bæði tvey hava nú tikið seg úr nevndini, og tí skal nýggjur limur og varalimur veljast í nevndina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein nevndarlim og ein varalim í nevndina

**Býráðsfundur 25. mai 2022:** Valdur varð Sigurd Hansen, sum fastur limur og Tóni Dam, sum varalimur.

**Ískoyti:**
Dánial Hansen hevur boða frá, at hann hevur tikið seg úr nevndini, og tí skal nýggjur limur veljast í nevndina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja ein nevndarlim í nevndina.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Valdur varð Andreas Nielsen sum fastur limur.

# <u>32/24 Hølisloysn til nýggja hádeild í Sankta Frans skúla</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 26/22 | 22/00894-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 29/22 | 22/00894-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 12.05.2022 | 37/22 | 22/00894-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 248/22 | 22/00894-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 25.10.2022 | 70/22 | 22/00894-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 26.10.2022 | 273/22 | 22/00894-1 |
| 7 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 235/22 | 22/00894-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 09.02.2023 | 9/23 | 22/00894-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 15.02.2023 | 32/23 | 22/00894-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 23.02.2023 | 67/23 | 22/00894-1 |
| 11 Býráðsfundur | 23.02.2023 | 44/23 | 22/00894-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 22.02.2023 | 20/23 | 22/00894-1 |
| 13 Trivnaðarnevndin | 26.01.2024 | 5/24 | 22/00894-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 28/24 | 22/00894-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 50/24 | 22/00894-1 |
| 16 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 32/24 | 22/00894-1 |
| 17 Býráðsfundur | | | 22/00894-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt hjá býráðnum 24. feb. 2022 í máli 21/02652 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu um at stovnseta hádeild (8.fl og 9.fl) í Sankta Frans skúla – at byrja frá skúlaárinum 2023/24.

**Lýsing av málinum**
Samtyktin inniber at pr. skúlaársbyrjan 2023/24 skal skúlin rúma tveimum 8. fl. og frá 2024/24 tveimum 8. fl. og tveimum 9.fl. Í sambandi við eina hádeild er eisini tørvur á ymiskum hjáhølum eitt nú til bólkaarbeiði, goymsluhøli, betri fakstovuhentleikar, tænastuhentleikar v.m. Umframt – alt eftir staðseting v.m. – hentleikar til starvsfólk. Um talan er um eina varandi hølisloysn og alt eftir, hvussu og hvar bygningurin verður bygdur kann roknast við einum fermetratalið á minst 800 m2 (við fyrivarni!).

Í kommunuætlanin frá 2020 stendur viðv. Sankta Frans skúla:
*"Innan nøkur ár verður væntandi farið undir høvuðsumvæling og útbygging av skúlanum. Tørvur er á betri parkeringsviðurskiftum."*
og
*"Fleiri dagføringar og neyðugar umvælingar standa eisini fyri framman. Fremstir í røðini eru Hoyvíkar skúli og Sankta Frans skúli."*

Sostatt er greitt, at tað er skilagott at hava framtíðar høvuðsumvælingar í huga nú farið verður undir at útvega hølisloysn til hádeildina. Hetta serliga tí at verandi høvuðsbygningur er frá 1931 og 1956 og tískil í nógvum førum ikki uppfyllir nútíðar krøv til bygningar sbrt. BK17. Forskúla/frítíðarskúlabygningurin er frá 2013. Hóast høgan aldur á høvuðsbygninginum so er hann í lutfalsliga góðum standi.

Gerast skal eisini vart við, at ætlan um dagføring v.m. av Hoyvíkar skúla er útsett fleiri ferð og raðfest fremri enn dagføring av høvuðsbygninginum hjá Sankta Frans skúla.

**Øki**
Skúlabygningarnir liggja í einum D3 øki. Har er galdandi at byggistigið má innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki í D2 og D3 ikki fara upp um 0,25 og nýtslustigið ikki fara upp um 0,5. Skúlabygningarnir

liggja á einum øki, ið er 6.985 m2 og byggistigið er á umleið 0,30 og nýtslustigið á umleið 0,59. Sostatt er greitt at byggisamtyktin ikki sum útgangsstøði loyvir meiri bygging á økinum. Harumframt er øki beint upp at D1 øki, ið er skógfriðað. Sostatt er sum útgangsstøði neyðugt at útvega annað lendi til tørvin. Í økinum er í høvuðsheitum tveir møguleikar – annar er at byggja út ella um á verandi øki og í øðrum lagi at byggja á økinum dagstovnurin Stella Maris heldur til. Hartil kemur spurningurin um møguliga eyka parkeringpláss. Hesir møguleikarnir kunnu innibera broytingum í byggisamtykt.

**Tíðarperspektiv**
Sum heild má tað ganga skjótt og væl um tað skal eydnast at hava eina varandi hølisloysn klára til skúlaársbyrjan 2022/23 og eigur tí eisini at vera umhugsað onkur fyribils loysn, ið verður brúkt inntil tann varandi loysnin fyriliggur. Helst eru onkrir møguleikar tí viðv. bæði viðv. fyribilshølum og evt. í nærøkinum.

Umsitingin kann – alt eftir samtykt í hesum máli – fara undir her í mars 2022 at gera eina kravseting til ein komandi og varandi hølisloysn og koma við boðum uppá staðsetingar. Á fundinum kemur umsitingin at geva metingar viðv. kostnaði av fyribils hølisloysn og varandi hølisloysn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka støðu til um farast skal:
a). fyrst undir fyrireikingar av eini varandi hølisloysn ella
b). eini fyribilsloysn, meðan ein verandi verður fyrireikað.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at taka undir við punkt a) í tilmælinum.

**Ískoyti**:
Síðani samtyktina seinast er umsitingin farin undir fyrireikingar av eini kravfesting og virksemislýsing til eina komandi hølisloysn og hevur viðgjørt møguligar staðsetingar.

Eitt verkætlanartoymið er skipað við umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting, og er verkætlanarleiðari settur. Tveir fundir hava verið við skúlaleiðslu og umboð fyri starvsfólk í skúlanum, og í vikuni verður fundur við frítíðarskúlan.

**Staðsetingar**
Umsitingin metir, at mest upplagda staðseting til eina útbygging av Sankta Frans skúla er á stykkinum har dagstovnurin Stella Maris liggur – t.e. matr. 807b. Fremsti fyrimunurin er at har ber til at byggja at kalla ótarnað hvat viðv. verandi skúla- og frítíðarskúlavirksemi. Umframt at bygging har sum útgangsstøði ikki viðførir tørv á broyting ella fráviki frá byggisamtyktini. Um stykkið hjá TK á matr. 807g verður tikið við ber til at byggja eina bygning á 700-900 m2. í t.d 2 hæddum. Matr. 807g liggur tó, í mun til matr. 807b, í sethúsaøkið sbrt. almennu byggisamtyktini. Fyribils metingin er at hetta fermetratalið er nøktandi uttan 807g.

Alternativt skal byggjast í verandi øki har skúlin er. Har kunnu ymsar loysnir hugsast t.d. byggja omaná verandi forskúla- og frítíðarskúlabygningi ella taka burtur verandi fimleikahøll og byggja nýggja fimleikahøll/felagshøli og 2 hæddir omaná. Báðar hesar loysnirnar krevja broytta byggisamtykt vegna, at bæði byggi- og nýtslustigini eru rokkin, umframt tilgongd í mun til skógfriðingina við Viðarlundina, ið er næsti granni. Eisini eru arkitektonisk/estetisk atlit til verandi serstaka og søguliga skúlabygningin, og serstøku Mariukirkjuna og Kerit vestanfyri.

Tískil vil tað innibera eina longri tilgongd uppá umleið 6 mánaðir, og tí ikki vist um tað letur seg gera. Vansin í hesum báðum førum er, at talan er um bygging inn í einum virknum skúlaøki, og kemur tað at viðføra týðandi ampa og helst, at forskúla- og frítíðarskúlavirksemi má flytast úr hølunum, meðan tað mesta av byggingini fer fram.

Eitt heilt annað alternativ, ið eisini er umrøtt, er at keypa Sankta Jósefs barnagarðin og lata nýggjan dagstovn byggja á økinum hjá Stella Maris og so innrætta Sankta Jósefs barnagarð til skúla.

Hetta krevur í fyrsta lagi samráðingar við katólsku kirkjuna í Belgia, ið varðar av stovninum, og vil so aftur krevja aðra bygging, áðrenn farast kann undir tillaging av bygninginum til skúla. Tískil má roknast við at tilgongdin tekur longri tíð.

Í sambandi við útbygging má roknast við kravi frá byggivaldinum sbrt. BK17 um fleiri parkeringspláss. Skúlin fær við eini hádeild – umleið 12 nýggj starvsfólk (lærarar og onnur innan tænastuøkið). TK er í samskifti við KFUK um møguleikan fyri at gera 22 parkeringspláss niðast á trøðni hjá KFUK. Serskilt mál verður lagt fyri nevnd um tað.

**Slag av virksemi**
Umrøtt hevur verið hvørt tað hevði verið ein fyrimunur heldur at bygt nýggj høli til grunddeildina (forskúla – 3 fl.) ella partar av henni og møguliga frítíðarskúlan ístaðin fyri at byggja nýtt til hádeildina (8-9 fl. og evt. 7 fl.). Mett verður at tað avgjørt er nakað, ið skal greinast nærri komandi tíðina. Mett verður at fyrimunurin við at byggja nýtt til grunddeildina hinmegin Varðagøtu er, at grunddeildin ikki í ein stóran mun hevur tørv á fakhølum v.m. í høvuðsbygninginum eins og hádeildin hevur. Tá ein endalig niðurstøða fyriliggur um staðseting vil umsitingin koma við endaligum tilmæli um tann spurningin. Um nýggju hølini verða bygd til grunddeildina, skal smábarnaskúlin dagførast til 8-9 fl. ella annað, sum í dag er í høvuðsbygninginum. 7 fl. er vanliga partur av hádeildini, og tí er tað fyrimunur, men ikki treyt, at 7 fl. eisini hevur flokshøli har hádeildin er.

**Innihald/funktiónir v.m.**
Komið er væl áleiðis við at greina neyðugar funktiónir til ymisk hølir og virksemi í eini hádeild og ymiskar avleiddar tillagingar, ið eru neyðugar í verandi bygningum sambandi við fakhøli (t.d. alis- og evnafrøði), felagshøli, hjáhøli, útiøki v.m. Hetta alt í sambandi við nú- og framtíðartørv innan skúlavirksemi.

Um tað hinvegin verður avgjørt at byggja til nýggja grunddeild er lutfalsliga skjótt at broyta uppá tilgongdina, men vil tað framvegis innibera ymiskar tillagingar í sambandi við fakhøli v.m., umframt umstøður til fleiri starvsfólk. Harumframt er innleiðandi farið undir greiningar í mun til hentleikar í skúlagarðinum.

**Ávegis kostnaðarmeting**
Á fundinum verður greitt frá ávegis kostnaðarmeting fyri nýbygging.

Havast skal eisini í huga, at Sankta Frans skúli, óansæð omanfyristandandi, yvir komandi árini hevur tørv á játtanum til vanligt viðlíkahald og dagføringar, umframt at skúlin eigur at fáa atkomuviðurskiftini, eisini fyri rørslutarnað, upp til nútíðarkrøvini. Hetta skal neyturviligvís ikki verða partur av verkætlanin við hølum til hádeild, men at tann byggiskráin sum verður gjørd til ítøkiligu verkætlanina tekur hædd fyri omanfyristandandi.

**Tíðarætlan**
Sbrt. býarsamtyktini frá 24. februar 2022 ynskir býráðið, at "... Sankta Frans skúli verður tvísporaður skúli frá forskúla til 9. flokk frá skúla árinum 2023/2024, ...".

Verkætlanartoymið metir, at tað óansæð val av omanfyri lýstu møguleikum, verður sera torført at fáa úvega eitt liðugt byggjarí/hølisloysn til skúlabyrjan eftir summarsteðgin 2023. Skal málið røkkast eigur tað í tilgongdini beinanvegin at kannast at útvega fyribilshølir, í eitt fyribilstíðarskeið, sum verður fram til minst jólini 2023 ella allarhelst summarfrítíðina 2024.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til:

a). at samtykkja at útbygging av Sankta Frans skúla skal vera á matr. 807b.
b). at umrøða hvørt grunddeild ella hádeild skal byggjast á matr. 807b, við atliti til at umsitingin kemur við neyvari tilmæli um tað til komandi fund.

Málið verður beint í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd og fíggjarnevndina.
**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmæli a) um at útbyggingin av Sankta Frans skúla verður á matr. nr. 807b treytað av góðkenning frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Tilmælið b) varð umrøtt.

**Ískoyti:**
UMMR hevur hin 8. apríl 2022 góðkent, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9 frá skúlaárinum 2023/24. Somuleiðis er góðkent, at Skúlin á Fløtum verður trýsporaður frá forskúla til og við 6. flokk og fýra sporaður frá 7. til 9. Flokk frá skúlaárinum 2023/24.

Trivnaðarnevndin samtykti 7. apríl 2022 at staðseta nýggju skúlaloysina til Sankta Frans á matr.nr. 807b, sum í dag er Stella Maris Vøggustova. Í málslýsingini framgongur, at krøv verða sett til at útvega fleiri parkeringspláss í tí sambandi.

Samskifti hevur verið við KFUK um nýtt parkeringspláss á teirra øki framvið Varðagøtu. Samskifti hevur eisini fevnt um ynski frá KFUK um betran av almennu atgongdini til KFUK-húsið og brúkinum av KFUK-bønum.

KFUK ynskir at varðveita og menna KFUK-bøin sum virksemisøki hjá KFUK og samstundis gera hann lutvíst atkomuligan fyri gjøgnumgongd hjá almenninginum, umframt gera ovara partin vælegnaðan til kavaskreiðing. Eisini ynskir KFUK at fáa skipaði og nøktandi parkeringsviðurskifti til egið virksemi og í økinum í sambandi við kommunala stovns- og skúlavirksemi, umframt almenna parkering.

Út frá tørvinum hjá bæði KFUK og kommununi er gjørt uppskot til avtalu um atgongd og brúksrætt til partar av økinum, meðan kommunan átekur sær uppgávuna at fremja og rinda fyri ávís verkløg, sí uppskot til avtalu. Endalig tilsøgn fyriliggur ikki frá KFUK.

KFUK hevur áhuga í at gera avtalu við kommunuan nú í sambandi við, at felagsskapurin fyllir 100 ár í juni. Avtalan hevur fíggjarligan kostnað við sær fyri kommununa, eingin ítøkilig kostnaðarmeting fyriliggur. Játtan er ikki tøk til útinnan av avtaluni, men eigur at verða tikið sum liður í ætlaða skúlabyggingini.

**Skjal**

- Uppskot til brúks- og samstarvavtalu millum KFUK og Tórshavnar kommunu

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býarverkfrøðingurin, býararkitekturin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at gera brúks- og samstarvsavtalu við KFUK og at heimilia umsitingini at fáa til vega kostnaðarmeting sum grundarlag fyri seinni viðgerð av játtan og verkætlan.
**Trivnaðarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, samtykkir at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku við einum fíggjarkarmi á í mesta lagi 30 mió. kr.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum tí málið ikki er nóg væl lýst.

**Ískoyti:**
í sambandi við málið um dagføring av skúlabygnað mál nr. 21/02652 sendi Tórshavnar kommuna Uttanríkis og mentamálaráðnum umsókn um broytingar í bygnaðinum viðvíkjandi Sankta Frans skúla, og verður í svari frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum boðað frá, at ráðið góðkennir ætlaðu broytingina, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2023/24 verður tvísporaður frá forskúla til og við 9. flokki.

**Bygningur til hádeild**
Tosað hevur verið um, at nýggi bygningurin kundi verið til grunddeildina og frítíðarskúla til forskúla, men í samráð við skúlan er niðurstøðan, at mælt verður til, at nýggi bygningurin verður bygdur til hádeildina, tvs. 7., 8. og 9. flokk, og at høli til alis- og evnafrøði verður í nýggja bygninginum, heldur enn at dagføra núverandi høli í høvuðsbygninginum, sum er til alisfrøði og til lívfrøði, til krøvini til alis- og evnafrøði í 8. og 9. flokki. Frítíðarskúlin í Sankta Frans ynskir at verða í lítla bygninginum i skúlagarðinum, heldur enn at flyta saman við grunddeildini í nýggjan bygning, sum eftir ætlan verður bygdur á økinum hjá Stella Maris.

7. flokkur verður roknaður sum partur av hádeildini, og nýggju skúlarnir í Tórshavnar kommunu eru bygdur soleiðis, at hvør deild hevur flokshøli í eind fyri seg. Tríggjar deildir eru í stóru skúlunum, tær eru grunddeild 1-3. fl., miðdeild 4.- 6. fl. og hádeild 7-9. fl. Í skúlum við forskúla, er forskúlin partur av grunddeildini. At deildirnar eru í somu eind, ger tað høgligari at arbeiða tvørtur um floksmørk, at skipa tiltøk á deildini, at samstarva bæði hjá næmingum og starvsfólkum og ikki minst at kenna seg sum eina eind.

At flokshølini hjá 7. flokki verða í nýggja bygninginum, gevur pláss fyri serflokkum í Sankta Frans skúla.

**Hølistørvur**

Samskift er við skúlastýrið og skúlans leiðslu um hølistørvin til tvísporaða hádeild 7.-9. fl., tvs. 6 flokkar. Harumframt skal gerast ein stova til alis- og evnafrøði. Aftrat koma aðrar vanligar hølisumstøður til starvsfólkarúm, næmingauppihald, ves, goymsla. Talan eru væntandi um byging uml. 1.100 fermetrar.

**Staðseting**
Skúlabygningurin verður bygdur á matr.nr. 807b. Ætlanin er, at aktomuviðurskifti og parkering verður frá Varðagøtu og til matr.nr. 807g, ið er kommunal ogn. Í hesum sambandi er ætlanin at gera avtalu við KFUK um verandi vegatkomu frá Varðagøtu um keyp og nýtslurætt til KFUK til parkering á matr.nr. 807g. Samskift verður eisini við ognina mat.nr. 807f um at keypa 220 m2 av stykkinum at leggja aftrat 807g. Fyrsta stig er at taka bygningin á matr.nr. 807b niður.

Hesar avtalur hava eisini týdning fyri tíðarætlanina og viðgerðina av byggisamtyktini fyri økið, sum má broytast, sí niðanfyri.

**Heimildir**
Sambært fólkaskúlalógini §57, stk. 4 góðkennir landsstýrimaðurin øll byggimál og allar útbyggingarætlanir, ásetur reglur byggimálum viðvíkjandi, og hvussu ein fólkaskúli verður innrættaður.

**Útiøki**
Útiøkini hjá skúlum skulu lagast til ymsu aldursbólkarnar, og nú hádeild verður í Sankta Frans skúla, er umráðandi, at umstøðurnar í skúlagarðinum vera góðar og eggja til spæl, læring og sosiala samveru. Útiøkið skal vera fjølbroytt og gjørt til ungfólk í aldrinum 13-16 ár. Útiøkið eigur at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm, tað skal vera stimbrandi hjá næmingum og stuðla teimum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsa hjá tí einstaka.

**Byggisamtykt**
Sambært almennu byggisamtyktini kunnu ávikavist byggistigið og nýtslustigið, í D3-umráði, verða í mesta lagi 25 % og 50 % av grundøkjavíddini. Roknast kann við, at uml. 500-600 fermetrar fara til parkering. Útiøkini verða tí, um byggingin er í tveimum hæddum, uml. 1.600-1.700 fermetrar. Tað eru uml. 10 – 12 fermetrar fyri hvønn næming. Í verandi SFS eru uml. 14 fermetrar fyri hvønn næming. Danskar vegleiðingar viðmæla minst 50 fermetrar. Í Eysturskúlanum og Skúlanum á Fløtum eru ávikavist 21 og 31 fermetrar. Ein grundgeving fyri at tað kann góðtakast at hava so lítið útiøki til hádeildina í SFS er, at beint sunnan fyri skúla er trøðin hjá KFUK, sum í skúlatíðini kann verða tøk hjá næminginum í hádeildini.

Grundøkjavíddin skal økjast uml. 220 m2, har tað eftir uppskotinum er neyðugt við broyting í byggisamtyktini, tá A1 øki til sethús og D3 øki til almennar bygningar verða løgd saman.

**Tíðarætlan**
Fyrsta stigið verður at víðka um grundøkjavíddina, har Stella Maris er, so pláss verður til ein nýggjan skúlabygning. Umráðandi er eisini at fáa gjørt eina avtalu við KFUK um vegatkomuna frá Varðagøtu til KFUK, so hendan vegatkoman eisini verður til nýggja skúlabygningin. At avgreiða hesi viðurskifti hevur skund, tí tað er ein fyritreyt fyri, at býarskipanardeildin kann byrja tilgongd at broyta bygginsamtyktina fyri part av A1-økinum, vestan fyri matr.nr. 807b, so hesin partur verður partur av D3-økinum, líka sum matr.nr. 807b har Stella Maris er. Er einki óvæntað, tekur ein byggisamtyktarbroyting vanliga uml. 6 mánaðir at avgreiða.

Meðan omanfyri nevnda er í gongd, kann fyrireikingarbeiðið gerast til niðurtøkuna av verandi bygningi. Sambært niðurstøðu hjá leiðsluni, frá 20.01.2022, ið byggir á tilmæli frá uttanhýsis ráðgevum, loysir tað seg ikki at umvæla og dagføra verandi bygning.

Møguligt er eisini í sama tíðarskeiði at fremja sjálvt niðurtøkuarbeiðið umframt at umleggja og endurnýggja gomlu kloakkleiðingina sum liggur oman í gjøgnum grundøkið, har verandi bygningur stendur.

**Ætlað mannagongd og útbjóðing**
Tilgongdin at gera byggiskrá og avgreiða brúkaraviðurskiftini, herundir endaligt rúmskema, kann eisini fara fram í sama í sama tíðarskeiðið. Tað er í hesum sambandi umráðandi at fáa nágreinað alla útgerð, tekniskar skipanir, krøv til yvirflatur v.m. í rúmskema í byggiskrá. Byggiskráin skal haraftrat vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi. Herundir fastleggja málbar góðskustig.

Útbóðingartilfarið skal tryggja, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum, t.d. at varðveita stóran part av verandi grótgarði og størru trøini. Eisini metir bygningsdeildin, at heildarbeiðstøkan, eins og í Skúlanum á Fløtum, ikki skal fevna um list, kunningarskelti, leyst innbúgv, teldur, skermar o.l. útgerð.

Á fíggjarnevndarfundi 19. okt. 2022 varð samtykt, "...at bjóða arbeiðið út í total arbeiðstøku...". Hetta er at skilja sum heildararbeiðstøka. Her metir tekniska umsitingin, at leisturin eigur at verða soleiðis, at tíð og játtan beinanvegin eru tøk.

**Kostnaðarmeting**
Ein kostnaðarmeting er viðheft. Kostnaðarmetingin byggir á framskrivaðan fermetrakostnað fyri endaliga kostnaðin fyri Skúlan á Fløtum. Afturat er íroknað kostnaður fyri ymiskt, sum kemur afturat í hesi verkætlanini, samanborið við Skúlan á Fløtum.

Eingin játtan er sett av til fyrireiking til útboð. Kostnaðarmetingin at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá við rúmskema, nágreining av útgerð, tekniskum skipanum, krøv til yvirflatur v.m., umframt at vísa til viðkomandi reglugerðir, kunngerðir, normar, SBI-vegleiðingar, aðrar vegleiðingar og krøv til arbeiðsumhvørvi, herundir at fastleggja málbar góðskustig, og at útbóðingartilfarið tryggjar, at býarskipanarlig atlit verða tikin til umhvørvið á staðnum er mett til kr. 0,5 mió.

Eisini er eitt uppskot til tíðarætlan fyri 2022 og 2023, ætlanin er eisini viðheft.

**Hjáløgd skjøl:**
SFS kostnaðarmeting Uppskot 1 20221024
Rúmskema í gerð Fyribils 20220920
Tilmæli frá býarskipanardeildini í sambandi við hádeild til Sankta Frans skúla
Uppskot til tíðarætlan

Skjølini eru í skjalamappu 22/00894-23

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a) at bygningur til hádeild hjá Sankta Frans skúla verður bygdur á 807b og 807g,
b) at gera útbjóðingartilfar, sum inniheldur byggiskrá og kravspesifikatión til skúlabygningin v.m. sum lýst omanfyri, og at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku,
c) at gera útbjóðingartilfar, at bjóða út og at taka av tilboði og gera sáttmála um arbeiðið at taka niður bygningin á matr.nr. 807b,
d) at játta kr. 0,5 mió av tøkum løgukarmi 4175 LK 41014 Dagføring, Skúlin við Løgmannabreyt, og stovna nýggja løgukontu 4176 Hádeild Sankta Frans skúli til at gera útbjóðingartilfarið pkt. b) og c), og
e) at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at viðgera broyting í byggisamtykt fyri økið.

Og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 25. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við pkt. a) og e), og at bjóða út í heildararbeiðstøku byggingina av skúlabygningi uml. 1.100 m2 umframt útiøki v.m., innanfyri ein karm uppá kr. 30 mió, harímillum at gera byggiskrá við kravspesifikatión, og at taka niður og burturbeina verandi bygning á matr.nr. 807b, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 26. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at byggja skúlabygning v.m. til hádeild varð bjóðað út til tveir arbeiðstakarar – Articon og HVT. Eitt tilboð kom inn, tað er frá HVT, og sum lýsir uppskot teirra til bygning, innrætting og funktiónir, byggitilfar v.m.

Í løtuni eru samráðingar um sáttmála við HVT, og ætlanin er, at býráðið kann samtykkja sáttmála og játta fíggingina til byggingina á næsta fundi.

Á fundinum verður kunnað um innkomna uppskotið til skúlabygning.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka kunningina til eftirtektar.

**Trivnaðarnevndin 09. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. februar 2023:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Við støði í uppskotinum og tilboðnum frá HVT Sp/f til nýggja hádeild til Sankta Frans skúla er samráðst um heildararbeiðstakarasáttmála. Sáttmálaupphæddin er kr. 28,125 mió u/mvg.

Skúlin hevði bert eina viðmerking til bygningsuppskotið, og tað var at fáa gjørt eitt reingerðarrúm eitt sindur størri. Hædd verður tikið fyri tí í prosjekteringini. Í samráðingunum er lendisarbeiðið eisini útgreinað.

Kloakkarbeiðið og parkeringsøkið fer í stóran mun at ganga fyri seg uttan fyri arbeiðstøkumarkið hjá HVT. Tað sæst aftur í kostnaðarmetingini sum byggiharraveiting, tvs. kostnaður aftrat sáttmálaupphæddini. Verandi rottangi verður tømdur og burturbeindur. Verandi høvuðskloakk, ið gongur í gjøgnum matr 807b, skal umleggjast, áðrenn jørð og kloakkarbeiði byrjar. Nýggja kloakleiðingin frá bygninginum verður bundin í nýtt reinsiverk. Parkeringsplássi verður avhendað til byggiharran planerað við 0-75 við regnavatnsleiðingum og vegristum.

Haraftrat eru vanligar byggiharraútreiðslur í sambandi við bygging, t.e. óvæntað, prís- og lønarvøkstur, byggiharraleiðsla og prosjektumsiting, listprýði 1,5%, lásaskipan, høvuðsreingerð, innbúgv, útbúnaður, útgerð til úiøkið og mvg.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri alt omanfyri nevnda er kr. 40.808.000, sí hjáløgdu kostnaðarmeting.

Sambært tíðarætlanini verður byggiplássið fyrireikað frá 6. mars 2023, og byrjað verður at taka niður Stella Maris-bygningin frá 22. mars 2023. Øll byggingin av hádeildini skal verða liðug og handað byggiharranum í seinasta lagi 8. juli 2024.

Í løgujátattanini til byggingina av hádeildini fyri 2023 eru játtaðar kr. 20 mió. Skal verkætlanin, sum hon nú fyriliggur eftir samráðingarnar, og har øll neyðug viðurskifti eru tikin við, skulu játtast kr. 20,8 mió aftrat. Skotið verður upp, at hetta verður fíggjað í løgujáttanini fyri 2024.

Skjøl:
-Heildararbeiðstakarasáttmáli

-Dagførd tilboðsmappa
-Kostnaðarmeting

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at samtykkja uppskotið til heildararbeiðsstøðusáttmála við HVT Sp/f uppá kr. 28,125 mió u/mvg, og at samlaða verkætlanin heldur seg innanfyri ein kostnaðarkarm uppá kr. 40.808.000 v/mvg.

Mælt verður í hesum sambandi til at játta kr. 19.425.000 av kontu 4176 Nýbygging skúlar, løgukarmi LK41018 til løgukontu L41018 Framhaldsdeild í Sankta Frans skúla, og at írestandi játtan kr. 20.808.000 verður fíggjað í løgujáttanini fyri 2024, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 22. februar 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2023:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekksteina tekur undir við Trivnaðarnevndini við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 38 mió. til verkætlanina og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við Trivnaðarnevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. februar 2023:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at tikið verður undir við uppruna tilmælinum um at játta kr 40 mió umframt at játta kr. 500.000 til sólorku í 2024, ið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og 1 blankari.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg. Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk og Bjørg Dam

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Síðani býráðssamtyktina 23. februar 2023 er heildararbeiðs-tøkusáttmáli gjørdur við HVT, arbeiðið er komið væl ávegis. Arbeiðið hevur sum heild gingið væl, bygningurin varð reistur og fyribils innilokaður á heysti 2023.

Verkætlanarleiðarin hevur, í samráð við stýris- og prosjektbólkin arbeitt við, at fáa til vega eitt fullfíggja yvirlit yvir allar veitingar og eyðmerkja møguligar avbjóðingar. Hetta í mun til tørvin hjá skúlanum og eisini fyri at fáa til vega neyðugar góðkenningar frá avvarandi myndugleikum, so eitt endaligt nýtsluloyvið kann fáast, tá heildararbeiðstakarin avhendar bygningin tann 8. juli 2024.

Við støði í skipanar-/prosjektuppskoti um atkomu, parkeringstørvi og keyp av lendi er gjørd munnlig avtala við nevndina í KFUK, sum verður løgd fyri aðalfund teirra til støðutakan í mars. Avtalan er fortreyt fyri nýtsluloyvi. HVT gevur tilboð um veitingar og arbeiði, so sum at endurnýggja KFUK-brekkuna, parkerings-pláss, gyrðingar og stuðlamúrar. Eisini íroknað gøtuljós, leiðingar í lendi, kantsteinar asfalt og skráar. Sí meira niðanfyri.

**Aftrat eru hesar uppgávur avgreiddar:**
- Greinað allar veitingar, sum eru aftrat heildararbeiðstøkuni.
- Liðugtgerð av rúmskemuðum og nágreiðan krøvini øll til øll rúmini.

- Eyðmerkt tørvin viðv. CTS-stýringum og ABA-anleggið við atliti at inniumhvørvið, trygd og at stýra orkunýtsluni.
- Avtalað er gjørd við Fjarhitafelagið um fyribils orkuskipan, luft til vatn, staðseting av hesi, og tíðspunkt tá Fjarhitafelagið skal veita orku til nýggja bygningin.
- Arbeitt verður við krøvum til internet og fiburnet, harundir krøvini til Skúlanet.
- Listprýðisarbeiðið er sett i gongd.
- Kostnaðarmetingin fyri byggingina er endurskoðað og dagførd, har nýggjastu tilboðini og avtaluseðlarnar frá HVT eru tiknir við.

**Støðan og átrokandi uppgávur at avgreiða ultimo januar 2024**

- Heildararbeiðstakarin skal ikki seinkast í at fáa til vega allar neyðugar tilfarsveitingar, herundir eisini neyðugar tilfarsveitingar í sambandi við tilkeypini. Hetta soleiðis, at alt er gjørt fyri, at heildararbeiðstakarin kann avhenda byggiharranum ein fullfíggjaðan skúlabygning, íroknað tilkeypini, í seinasta lagi 8. juli 2024.
- Tilboð uppá fullfíggjaða liðugtgerð av alis- og evnafrøðisstovu, íroknað alt fast innbúgv eisini til at atknýtta goymslurúmið.
- Í februar 2024 skulu fáast til vega tilboð uppá fast innbúgv til øll rúm, her í íroknað talgildar undirvísingarskíggjar.
- Í februar/mars 2024 verður skipað fyri útboði og lisitatión uppá leyst innbúgv. Hetta soleiðis at leysa innbúgvið verður veitt og uppsett í skúlanum í viku 29, vikuna eftir avhendingina.
- Ískoytissáttmáli til heildararbeiðstøkusáttmálan verður gjørdur við heildararbeiðstakaran um lendi- og lendisfestisarbeiðið í sambandi KFUK-brekkuna og parkeringina, sbrt. tilboði frá heildararbeiðstakaranum, dagf. 09.01.2024. Her er sera átrokandi, at projekteringsarbeiðið byrjar beinanvegin, fyri at leiðslan kann avgreiða avtaluna við KFUK.

**Skjøl:**

- Dagførd kostnaðarmeting, revisión C, dagf. 25.01.2024.
- Dagførd tíðarætlan fram til skúlabyrjanina miðjan august 2024.
- Endaligt skipanaruppskot til KFUK-brekkuna, parkeringviðurskiftir v.m.

**Samanumtøka:**
Verkætlanin, og viðlagda dagførda kostnaðarmetingin, revisión C, fevna nú um allar neyðugar veitingar til tess, at skúlin lýkur allar neyðugar treytir og krøv.

Verkætlanin og dagførda kostnaðarmetingin fevna eisini um allarflestu veitingar í skulu til, fyri at KFUK-brekkan og parkeringsviðurskiftini verða nøktandi hjá bæði KFUK og nýggja skúlabygninginum, og sum er fortreyt fyri nýtsluloyvi. Kostnaður íroknað lendiskeyp er uml. kr. 5,5 mió.

Haraftrat eru aðrar uml. kr 4 mió til sjálvan bygningin, sum fevnir um eina røð av postum, har teir størstu CTC-stýringar og ABA (kr. 0,75 mió) eru alis- evnafrøðisstovan (uml. 0.7 mió), og keyp av lendi (kr. 0,756 uttan tinglýsing og matrikulering).

Eftir hesum er neyðugt at víðka kostnaðarkarmin úr kr. 38 mió v/mvg til kr. 47,5 mió v/mvg, tvs. ein fíggjartørvur á kr. 9,5 mió. Slík løgujáttan er ikki tøk á grein 4 í fíggjarætlanini.

Mest týðandi í løtuni er at tryggja, at bygningurin verður liðugur til tíðina umframt avtaluna við KFUK, har fíggjartørvurin tilsamans er kr. 5 mió. Støðutakan til endaliga lendisprojektið og fígging av tí verður at taka upp seinni.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at játta kr. 5 mió av tøkum peningi 2023 til liðugtgerð av skúlabygninginum og keyp av lendinum sum eykajáttan til løgukontu L41018 Hádeild Sankta Frans skúli og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til tvær viðgerðir.

**Trivnaðarnevndin 26. januar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

## 33/24 Nýggj høli til frítíðarskúlan í Kollafirði, Úthangið og Kura

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 7/21 | 21/00499-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 24.03.2021 | 2/21 | 21/00499-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 99/21 | 21/00499-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 114/21 | 21/00499-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 12.05.2021 | 109/21 | 21/00499-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 08.06.2022 | 136/22 | 21/00499-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 09.11.2022 | 210/22 | 21/00499-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 04.05.2023 | 93/23 | 21/00499-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 07.06.2023 | 124/23 | 21/00499-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2023 | 158/23 | 21/00499-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 04.10.2023 | 166/23 | 21/00499-1 |
| 12 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2023 | 5/23 | 21/00499-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 01.11.2023 | 181/23 | 21/00499-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 14.02.2024 | 43/24 | 21/00499-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 26/24 | 21/00499-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 51/24 | 21/00499-1 |
| 17 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 33/24 | 21/00499-1 |

**Upprunin til málið**
Hølistørvur og at savna námsfrøðiligu tilboðini aftur við Botnavegin.

**Lýsing av málinum**
Frítíðarskúlin í Kollafirði og ungdómstilboðið Úthangið halda lutvíst til í skúrum, sum eru bygdir saman við hús hjá kommununi og hús hjá Skótaliðnum Túgvan í Kollafirði, Botnavegur 3, alt á einum matrikkli.

Skúrarnir eru gamlir, í sera ringum standi og ótíðarhóskandi. Nýggj hølisloysn eigur at verða fingin til vega sum skjótast. Kommunan leigar skúrarnar frá skótaliðnum.

Dagstovnurin Kura, Botnavegur 9, varð tikin í nýtslu síðst í 2016, men síðstu tvey árini hevur Kura ikki rúmað øllum børnunum. Ein vøggustova hevur sostatt hildið til Millum Bóla, har dagstovnur áður var, og sum nú er eldratilhald hjá Heilsu- og umsorganartænastuni.

Fyri Kura er stór avbjóðing at reka tvey støð langt frá hvørjum øðrum til dagstovnavirksemið bæði við atliti at starvsfólkum og játtan.

Leiðarin á Kura hevur leiðsluábyrgd av øllum námsfrøðiligu tilboðunum. Ynskið er, at øll námsfrøðiligu tilboðini verða savnað aftur við Botnavegin.

Á løguætlanini 2021 eru kr. 2 mió settar av til Frítíðarskúlan í Kollafirði.
Uppskot er at fáa í lag avtalu við skótaliðið um skúrarnar, so at teir kunnu takast burtur, og at kommunan byggir uppí húsið, sum kommunan eigur. Við at umleggja virksemið, har tey elstu børnini í Kura flyta í frítíðarskúlan, kann vøggustovan Millum Bóla flyta aftur í Kura.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin
Arbeiðsumhvørvislógin

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at til ber at útinna byggingina í heildarveiting við støði í byggiskrá. Hesar fyrireikingar verða mett at kosta uml. kr. 150.000.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Verður at leggja fyri Kollafjarðarnevndina til ummælis.

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til
- at geva umsitingini heimild til at samráðast við Skótaliðið Túgvuna um avtalu viðvíkjandi skúrunum at leggja aftur fyri nevndina,
- at útvega byggiskrá sum grundarlag fyri útboði um heildarveiting at leggja aftur fyri nevndina,
- at játta kr. 150.000 til at gera byggiskrá, fyrireika útboð v.m. av kontu 3175 Barnaansing (løgur) ætlað Frítíðarskúlanum í Kollafirði og stovna løgukontu til endamálið, og
- beina málið í býráðið um Kollafjarðarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um Kollafjarðarnevndina og fíggjarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 24. mars 2021:** Borgarstjórin greiddi frá um hvat TK kundi hugsað sær við verandi húsi. Húsið er í ringum standi. Kanska rivið húsið niður og bygt nýtt hús. TK skal hava fund við skótarnar.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið við umboð fyri skótafelagið at avtala tilgongd neyvari.

Uppskot er at byggja nýggjan bygning, sum verður samanbygdur við verandi hús, í tveimum fullum hæddum (2x120 m2), har skótafelagið hevur ovaru hæddina og kommunan niðaru hæddina til virksemið hjá Kura og Úthanginum.

Hetta verður mett at nøkta tørvin hjá báðum pørtum, eins og at møguleiki er framhaldandi er at samstarva um hølir hvør hjá øðrum, tá tørvur er. Talan er tó eisini um ein størri bygning enn verandi.

Skotið verður upp at skipa tilgongdina soleiðis, at skótafelagið og kommunan beinanvegin gera yvirskipaða tørvslýsing, t.e. lýsing av hølistørvi, rúmbýti v.m., og at hetta saman við vanligum krøvum til bygginginа verður grundarlag fyri útboði í heildarveiting. Spurningur um jarðhitaskipan eigur at verða tikin upp samstundis.

Skótafelagið upplýsir, at tað hevur møguleika at søkja um stuðul. Ynskið er eisini, at talan er felags verkætlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til, at nevndin á næsta fundi hevur tørvslýsingina tøka til víðari samtykt um útboð.

**Mentamálanevndin 12. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ástaðarfundur hevur verið millum umboð fyri Barna- og Ungdómsdeildina, eindarleiðara, stovnsleiðaran á Kura, og umboð fyri Bygningdeildina.

Semja er um, at besta loysnin fyri at loysa átrokandi tørvin hjá frítíðarskúlanum, samstundis sum at dagstovnavirksemið í Kollafirði verður savnað við Botnánna og at nokk av dagstovnaplássum eisini verða til framtíðina er at gera útbyggingarnar sum eina samanhangandi verkætlan.

Besta loysnin fevnir sostatt um tvey byggistig. Tað er at gamla vatnverkið við Botnaveg 7, sum Tórshavnar kommuna eigur, verður tikið niður og at fyribilshøli, t.d. modulir, sum er egnaði til dagstovnavirksemi, verða sett har í staðin.

Síðani kann frítíðarskúla- og ungdómsvirksemið flyta inn í fyribilshølini, meðan nýggj høli til frítíðarskúla og ungdómshúsið verða bygd, har verandi frítíðarskúli er.

Tá fyrsta byggistig er liðugt og frítíðarskúlin og ungdómshúsið aftur kunnu flyta inn, kunnu modulini nýtast til at hýsa vøggu- ella barnagarðsstovu, meðan næsta byggistig verður gjørt og ein lon verður bygd afturat dagstovninum Kura.

Tá næsta byggistig er liðugt kunnu modulini flytast av økinum, og økið gerast um til parkeringsøki til dagstovnin Kura. Modulini kunnu tá flytast og nýtast aftur á sama hátt, sum fyribilsloysn í sambandi við aðra útbygging á dagstovnaøkinum.
Við at gera eina samanhangandi verkætlan, fæst sum mest fyri pengarnar.

*Hølistørvur frítíðarskúlin*
Mettur tørvur er upp til 60 børn í frítíðarskúlanum. Hetta er, tá roknað verður við fýra árgangum í frítíðarskúla samstundis (0 – 3.flokk). Tá er hædd tikin fyri møguligum forskúlatilboði í Kollafirði, sum alt annað líka útloysir størri tørv á frítíðarskúlatilboði.

Samlaða víddin á bygninginum til frítíðarskúlan skal tí rúma 60 frítíðarskúlanæmingum, umframt at umstøður skulu vera til barnavesi, starvsfólkavesi og starvsfólkarúm, felagshøli og køk (er í dag í nýggjasta partinum), aktivitetsrúm/verkstað, inngongd/garderobu og eventuelt vátrúm til útiklæðir, reingerðarrúm og goymslurúm.

Hóast bygningurin liggur nærhendis dagstovninum Kura, er neyðugt at bygningurin sjálvstøðugt inniheldur allar neyðugar hentleikar og rúm, soleiðis at børn/starvsfólk ikki noyðast at renna millum bygningarnar.

Við fermetraútrokning til frítíðarskúlanæmingar, umframt neyðugu tilhoyrandi hølini, er tørvur á umleið 300 $m^2$ til frítíðarskúlan. Í dag hevur frítíðarskúlin uml. 250$m^2$ at ráða yvir, sum tó eru illa innrættaðir til endamálið.

Nýggi bygningurin hjá frítíðarskúlanum er góðar 120$m^2$ til støddar, og er í góðum standi. Tørvur er tí ikki á at byggja nýggjar 300$m^2$, men ístaðin byggja afturat hesum.

*Hølistørvur Dagstovnurin Kura*
Í dag er ein vøggustova staðsett Millum Bóla, har dagstovnur var fyrr. Hetta gevur avbjóðingar við, at virksemið hjá Kura í dag er spjatt á tríggjar ymsar matrikklar, har vøggustovan Millum Bóla er longst burtur frá dagstovninum.

Fyri at savna alt virksemið hjá Kura við Botnavegin, umframt at leggja upp fyri vaksandi barnatali í Kollafirði í sambandi við útstykkingar, er tørvur á at byggja eina lon afturat verandi fýra lonum.

Hvør lon er 220$m^2$, og vildi ein eyka lon tí givið 220$m^2$ afturat verandi stovni.
Útbygging av einari lon afturat vestureftir vildi tikið ein part av verandi parkeringsplássi.

Til ber at víðka parkeringsplássið á økið, har gamla Vatnverkið í dag stendur.

*Sáttmálabindingar*
Sáttmálabindingar eru á matrikkul 107o í sambandi við leigumálið hjá Skótaliðnum Túgvan í Kollafirði, sum neyðugar eru at loysa, um farast skal víðari við verkætlanini.

Tórshavnar kommuna eigur matrikkul 107o, har frítíðarskúlin við Botnánna og Skótaliðið Túgvan í dag húsast.

Skótaliðið Túgvan leigar undirlendið, har bygningarnir hjá Skótaliðnum standa, frá Tórshavnar kommunu, og kann hesin leigusáttmáli setast úr gildi við 1 ára uppsøgn til ein 1. Januar. Sleppast kann tá úr leigusáttmálanum pr. 1. Januar 2024. Mælt verður til, at hetta verður gjørt.

Tórshavnar kommuna leigar í dag ein stóran part av bingjunum frá Skótaliðnum Túgvan, og kann hesin leigusáttmáli setast úr gildi við 6 mánað uppsagnarfreist til ein 1. Juli. Sleppast kann tá úr leigusáttmálanum til 1. Juli 2023. Mælt verður til, at hetta verður gjørt.

Mælt verður somuleiðis til at fara í samráðingar við Skótaliðið Túgvan um at sleppa úr leigumálinum fyrr enn hesar ásettu freistir, soleiðis at sleppast kann undir arbeiðið sum skjótast.

Í leigusáttmálanum um lendið er ásett, at eigarin kann krevja at yvirtaka møguligar fastar ognir, bygdar á tí leigaða lendinum, fyri eitt virði ásett av 2 óheftum metingarmonnum. Mælt verður til at yvirtaka húsið hjá Skótunum, men at krevja burturbeining av bingjunum á lendinum.

Best er, um hetta verður loyst í samráðingum við Skótarnar, tó tað ber til at halda seg til leigusáttmálan, um samráðingar ikki bera á mál.

Tá báðir leigusáttmálar eru farnir út gildi, hevur Tórshavnar kommuna fullan ræðisrætt á lendinum og ástandandi ognum.

Hetta er ein fortreyt, um Tórshavnar kommuna ætlar at byggja á matrikkul 107o og hava fullan ræðisrætt á lendi og ástandi ognum.

*Kostnaðarmeting*
Greitt verður frá fyribils kosntaðarmetingum á fundinum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og Ungdómsdeildini mæla til, at verandi leigusáttmálar verða uppsagdir, og at verkætlanin verður fyrireikað til útboð sum heildarveiting sambært tørvslýsingini.

**Mentamálanevndin 08. juni 2022:** Samtykt at taka upp samráðing við Skótaliðið Túgvuna um endurskoðan av leigusáttmálunum við tí fyri eygað, at dagstovna-, frítíðarskúla- og ungdómsvirksemið verður savnað við Botnánna.

**Ískoyti:**
Ávíst samskifti hevur verið skótaliðið um loysn, har kommunan yvirtekur teirra felagshús afturfyri, at kommunan útvegar skótaliðnum aðra nøktandi hølisloysn.

Umsitingin hevur samstundis eisini kannað nærri, hvussu kommunan sjálv kann loysa tørvin á at samla alt námsfrøðiliga virksemið í Kollafirði við Botnánna í egnum hølum, harímillum eisini at fáa vøggustovuna, sum í dag er í millum Bóla (sethús í Líðini 20), inn í Kura.

Skal tað gerast, er neyðugt at umskipa virksemið soleiðis, at nýggj høli verða fingin til vega, og at partar av eldru barnagarðsbørnunum flyta úr Kura, tí stovnurin er ov lítil.

Saman við stovnsleiðaranum hevur umsitingin gjørt lýsing av hølistørvi til tess at samla alt virksemið hjá Kura – t.e. vøggustovur, barnagarðsstovur, frítíðarskúla/-tilboð 0.-3. flokk og ungdómsvirksemið (Úthangið). Ætlandi er forskúli í Kollafjarðar skúla frá næsta skúlaárið.

Uppskot til loysn er at byggja nýggjan bygning uml. 270 m2 í økinum millum dagstovnin Kura og samkomuna Sion, samstundis sum verandi verkstaðsbygningurin har verður tikin niður.

Nýggi bygningurin fer høvuðsheitum at vera frítíðarskúli til 60 børn. Haraftrat skal hann hava hølir til eina barnagarðsstovu, so at til ber at fáa eina vøggustovu í Kura, umframt at pláss skal vera til tey 6 ára gomlu

á dagstovni allan dagin (bæði um tey eru á dagstovni allan dagin ella bert í frítíðarskúla í sambandi við forskúlan).

Aftrat er kommunali bygningurin, har frítíðarskúlin er í dag, tó uttan teir í dag leiguaðu skúrarnir hjá skótunum. Hesin bygningur er egnaður til barnagarðsbørn, sum hava serligar avbjóðingar, sum soleiðis fáa hóskandi og víðari karmar enn teir í Kura. Um kvøldið verður ungdómstilboðið hjá Úthanginum í bygninginum.

**Nýggi bygningurin uml. 270 m2**

Hølistørvur inni:

- Alrúm/køkur + kova/goymslurúm til mat og køksútgerð (+køliskáp, frystiskáp/boks).
- Verkstaður (uml. 20m$^2$)
- 4-5 aktivitetsrúm (uml. 18-20 m2 hvørt)
- 1-2 minni uppihaldsrúm (uml. 12-15 m2 hvørt)
- Goymslurúm til kreativt tilfar, ting, stólar og borð v.m.
- Garderoba/vesi v.m. til øll børnini
- Starvsfólkarúm við tekøki
- Starvsfólkavesir
- Reingerðarrúm við plássi til vaskimaskinu og turkitrumlu + depot
- Tøknirúm v.m.

Hølistørvur úti:

- Neyðugt er at gera ein stóran skúr ella tveir minni skúrar til goymslu av tingum til útivirksemi, m.a. súkklur, spannir, spakar, gummibát, bóltar v.m., sum verður nýtt úti, men má goymast burtur, tá ið frítðíðarskúln er liðugur fyri dagin.

Útiøkið annars:

- Kura og frítíðarskúlin skulu hava fyrsta ræðisrætt til útiøkið (matr.nr. 107o/Botnavegur 3), og at samstarv er við skótarnar um útiøkið annras.

Fermetratørvur nýggi bygningurin:

- Til barnagarðsbørn er eitt krav, at tað eru 2m$^2$ av fríum uppihaldsrúmi til hvørt barn, tá alt innbúgv og naglafast, so sum skáp, køkur v.m., er trekt burturav. Tað gevur í hesum føri eitt minimum á 120m$^2$ av fríum uppihaldsrúmi, ið skulu rúmast í bygninginum. Afturat hesum koma øll onnur rúm so sum inngond, gongir, vesir, starvsfólkarúm, goymslurúm, reingerðarrúm, verkstaður v.m.
- Tað finnast eingi neyv krøv til frítíðarskúla. Men tá hugt verður eftir bygningunum hjá Spíranum í Havnardali, eru 4,4m$^2$ til hvørt barnið – og tá er alt íroknað omanfyri, eisini inngongd, vesir o.s.fr. Verður útgangsstøði tikið í hesum fermetratalinum, verður tørvur á uml. 270 m2.

Um hetta er tað endaliga talið og um tað er nóg mikið til at rúma tí hølistørvi, ið er lýstur frammanfyri her, er ikki staðfest. Talan er tí um eitt vegleiðandi fermetratal at nágreina.

Tilgongd víðari:
Í løguætlanini kontu 3175 Barnaansing eru kr. 2 mió tilsamans tøkar til endamálið. Hetta røkkur ikki til ta støðd, sum lýst er omanfyri, umframt niðurtøku av verkstaðsbygninginum. Av hesum kr. 2 mió eru kr. 150.000 áður játtaðar til fyrireikingar og útboð.
Skotið verður upp, at umsitingin ger eitt uppskot til innrætting av nýggju nýggju hølunum svarandi til nágreinaðum hølistørvi, sum yvirskipað er lýstur omanfyri, og hvussu hetta best kann skipast og staðsetast í økinum.

Tá hetta fyriliggur, ber eisini til at fáa gjørt eina kostnaðarmeting og tilfar til útboð, har tað kann verða lagt upp til bygging sum innflutt modulbygging ella sum bygdar lonir eins og Kura er bygt.

Harumframt skal byggi- og býarskipanarnevndin viðgera mál um staðsetingina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at samla alt námsfrøðiliga virksemið hjá Kura við Botnánna sum lýst er omanfyri, og í hesum sambandi:

- At kommunan ger uppskot til innrætting av bygningin uml. 270 m2 og krøv annars til bygningin og útiøkið
- At kommunan fær til vega kostnaðarmeting sum grundarlag fyri seinni viðgerð um støðutakan til at bjóða byggiarbeiðið út
  At beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina um staðseting.

**Mentamálanevndin 09. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Samsvarandi samtyktini 9. november 2022 hevur umsitingin, saman við BRIM Arkitektum, gjørt hugskotsskitsu til staðseting av nýggjum frítíðarskúla á økinum millum dagstovnin Kura og samkomuna Zion. Endamálið er at fáa savnað alt dagstovna-, frítíðarskúla- og ungdómsvirksemið við Botnánna, harímillum eisini vøggustovuna millum Bóla.

Skitsan tekur støði í tørvslýsingini, har nýggj høli skulu útvegast til 60 frítíðarskúlabørn frá 0.-3. flokk, umframt at hava rúm til at hýsa teimum 6 ára gomlu á dagstovninum. Hædd er við hesum tikin fyri, um forskúli verður settur á stovn í framtíðini.

Harumframt tekur skitsan støði í tørvslýsingini til útiøkið, har víst verður á tørvin á einum øki til uttandura virksemið hjá frítíðarskúlanum, umframt goymslurúm til útgerð v.m., ið er knýtt at útivirkseminum, men sum mugu goymast burtur, tá frítíðarskúlin er liðugur fyri dagin.

Av skitsuni sæst uppskot, har verandi spæliøkið og parkeringsplássið verður umskipað. Loysnin flytur bilarnar niðan ímóti vegnum, meðan spæliøkið verður uppat náttúruøkinum oman ímóti ánni.

Á stykkinum er sambært byggisamtyktini pláss at byggja 200 m2 í tveimum hæddum, ella tilsamans 400 m2. Í upprunaætlanini hevur verið arbeitt við bygningi uppá 270 m2. Tá til ber at byggja størri og fyri at leggja upp fyri møguligum vøkstri í barnatalinum, mælir umsitingin til at arbeiða víðari við ætlan, sum er bygging uppá 350 m2.

Ætlaða staðsetingin av frítíðarskúlanum krevur, at bygningurin, har gamla vatnverkið var, skal takast niður.

Tilgongd:
Umsetingin mælir til, at BRIM Arkitektar sum ráðgevi gera útbjóðingartilfar klárt til útboð. Skitsan verður partur av útbjóðingartilfarinum, sum saman við eini hølis- og byggiskrá, verður sent út í innbodna kapping um heildararbeiðstøku millum tríggjar heildararbeiðstakarar.

Útbjóðingartilfarið skal millum annað fevna um treytir, um prosjekttilfar, ið skal latast inn saman við tilboðum, lýsa hvussu tilboðini verða dømd t.d. loysn, prís, góðsku og tíðarætlan. Mælt verður til, at heildararbeiðstakarar fáa samsýning fyri at lata inn skikkað tilboð. Umsiting mælir til, at samsýningin verður 35.000 kr. fyri hvørt skikkað tilboð.

Skotið verður somuleiðis upp, at ráðgevin hevur byggileiðslu og eftirlit við sjálvum arbeiðinum.

Í løguætlanini kontu 3175 Barnaansing eru kr. 2 mió tilsamans tøkar til endamálið á kontu 3175 Barnaansing løgur, projektkontu L31014 Nýggj høli til FTS í Kollafirði, Kura og Úthangið. Av hesum eru kr. 150.000 áður játtaðar til fyrireikingar og útboð.

Afturat hesum eru kr. 2,5 mió. tøkar til tillagingar á dagstovnaøkinum á kontu 3175 LK31015, ið eisini kunnu brúkast til endamálið. Hetta er sostatt kr. 4,35 mió tilsamans. Upplýsast skal, at tað eru eisini onnur mál, sum koma at hava tørv á løgufígging, harímillum Býlingshúsið á Ternuryggi (mál 22/05165).

Væntast kann, at verður verkætlanin boðin út í summar, kann byggiarbeiðið fara í gongd í heyst og fellir ein partur av íløgutørvinum tí í 2024 og møguliga eisini í 2025.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á Barna- og Ungdómsdeildini og deildarleiðarin á Bygningsdeildini mæla til at heimila umsitingini:
- at gera útbjóðingartilfar um frítíðarskúlabygning uppá 350 m2 og tilhoyrandi útiøki
- at bjóða byggingina út millum tríggjar arbeiðstakarar í heildarbeiðstøku, og at teir bjóðandi fáa samsýning kr. 35.000 fyri skikkað tilboð, og
- at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina um at góðkenna staðsetingina sambært skitsuni.

**Mentamálanevndin 04. mai 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vegna hølistørv og hægri barnatal, verður frá august 2023 ikki pláss fyri tilmeldaðu børnunum í núverandi frítíðarskúla í Kollafirði. Sambært barnatalinum kunnu frá august 2023 verða upp til 44 børn í frítíðarskúlanum.

1. flokkur, 16 børn
2. flokkur, 16 børn
3. flokkur, 12 børn

Góðskan og arbeiðsumhvørvið í núverandi hølum er ónøktandi, og tí er onnur loysn blivin kannað, og vilja dagstovnaleiðari, eindarleiðari, deildarleiðari og leiðari fyri Ítróttaanleggum mæla til, at køkur og uppihaldsrúm við síðuna av køkinum í Høllini í Kollafirði fyribils verða tøk til frítíðarskúlan at nýta í tíðarskeiðnum frá kl. 11.00-17.00 skúladagar.

Fyri at uppihaldsrúmið fyribils kann nýtast til námsfrøðiligt virksemi, skulu smærri tillagingar gerast við innbúgvi og ljóðdoyvandi plátum. Aftrat skal keypast innbúgv og tilfari. Kosntaðurin kann fíggjast av rakstrarkontu 3214 Broytingar og minni umvælingar.

Semja er millum frítíðarskúlan og KÍF um nýtslurættin hjá frítíðarskúlanum í køkinum og rúminum við síðurnar køkinum í høllini í Kollafirði. Tað kunnu verða serlig viðurskiftir, ið gera frávik í sambandi við nýtslurættin, og verða hølini ikki brúkt tá. Hesi viðurskiftir kunnu t.d. verða jarðarferð og hondbóltsdystir í móti kappingarenda. FTS brúkar ikki hølini eftir kl. 17.00 og í vikuskiftunum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðari fyri Barna- og ungdómsdeildina mæla nevndini til at taka undir við fyribils hølisloysnini til part av frítíðarvirkseminum hjá Kura í høllini í Kollafirði.

**Mentamálanevndin 07. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina í Mentamálanevndini hin 04. mai 2023 verður nevndin biðin um at viðgera staðsetingina av frítíðarskúlanum. Sí hjáløgdu støðumynd, sum varð latin inn við vinnandi tilboðnum hin 26. sept. 2023

Verkætlanin hevur sum fortreyt, at bygningurin á økinum verður tikin niður. Vatnmeistarin hevur upplýst, at einki virksemi hevur verið í bygninginum, síðani vatnverkið varð flutt. Gøtuljósdeildin brúkar partar av bygninginum til goymslu, hetta hóast hann liggur nakað avsíðis. Avrátt er, at Gøtuljósdeildin flytir tilfar úr bygninginum, í góðari tíð áðrenn niðurtøku av bygninginum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Býararkitekturin og deildarleiðarin á Bygningsdeildini mæla nevndini til at taka undir við ætlaðu staðsetingini av nýggjum Frítíðarskúla í Kollafirði, at onnur staðseting til virksemið hjá Gøtuljósdeildini verður funnið, tá byggingin fer í gongd, og at beina málið til kollafjarðarnevndina umvegis mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at tekna og byggja nýggjan frítíðarskúla í Kollafirði er bjóðað út og tilboð komin inn frá Articon, Búsetur og HVT. Uppskotini eru mett og dømd út frá krøvum til góðsku í bygningi, funktión og kostnaði. Í dømingini hevur kostnaður vigað 40%.

Á fundinum verður greitt frá tilgongdini og uppskotunum, umframt niðurstøðuni hjá dómsnevndini, har tað er uppskotið hjá Articon, sum mett er tað besta, tó at tað ikki er tað bíligasta. Kostnaðarmeting fyri hetta uppskotið umframt byggiharraútreiðslur, mvg o.a. liggur sum hjálagt skjal.

Fígging er ikki tøk til at seta byggingina í gongd. Tilgongdin víðari má taka hædd fyri, nær hugsast kann, at byggingin kann byrja. Skotið verður upp, at samráðst verður um vinnandi uppskotið, harímillum tíðarætlan, sum tekur atlit at fíggingini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at heimila umsitingini at samráðast við Articon um arbeiðstøkusáttmála, og koma aftur í nevndina við yvirliti yvir fíggjartørv í 2024 og 2025.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2023:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, ynskir at viðgera málið til nærri støðutakan á seinni fundi.

Ein minniluti, Annika Olsen og Súsanna Olsen, tekur undir við tilmælinum.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2023:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 01. november 2023**: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í eini tilgongd saman við ArtiCon og samrátt um møguliga arbeiðstøkusáttmála.

Í mun til hini tilboðini, høvdu ArtiCon í tilboðnum, sett munandi meira av til útiøkið. Talan var um eitt fullfíggjað spælipláss við allari útgerð. Harumframt breiddi parkeringsplássið seg inn á økið hjá KURA, sum gjørdi annlegs arbeiði nakað størri enn neyðugt. Sí skjal *"Støðumynd 1&2"* ið vísir støðumyndina úr tilboðnum og nýggja støðumynd.

Í samráð við umsitingina, hevur ArtiCon framleitt nýggja støðumynd har spæliútgerðina er tikin úr, og P-plássið er minkað í tí síðuni, sum vendir mótir KURA. Skotið verður upp at gera tvey P-pláss móti Zion. Neyðugt verður samstundis at arbeiða við umskipan av markinum millum Zion og Frítíðarskúlan.

Í samráðingunum um sáttmála hevur prosjekteringskostnaðurin eisini verði til viðgerðar. ArtiCon kann spara nakað í prosjekteringsleiðslu og prosjektuppfylging.

Samanlagt er nú lagt upp til ein arbeiðstøkusáttmála á **16.685.379,24** móti 18.695.345,09 sum tilboðið ljóðaði. Sí skjal *"Samanber tilboð 1&2"* Samanborið við hini tilboðini er útreiðslan til "Jørð og Lendisarbeiði" nú meira lík. Samanlagt er tilboðið hjá ArtiCon miðskeiðis millum hini tilboðini, bæði í mun til arbeiðstøkuupphæddina og krónur pr. fermetur.

Sí eisini skjal *"samlað kostnaðarmeting dagf. 08.02.2024"* Viðmerkjast skal, at nú er spæliplássið ikki við í kostnaðarmetingini, og tí verður neyðugt at taka fígging av útiøkinum upp í aðrari málsgongd.

Í samráðingunum var tíðar- og gjaldsætlan er eisini viðgjørd. Undirskriving av sáttmála er sett at verða í mars mánaði. Síðani halda fyrireikingarnar fram, og høvuðsprosjektið, verður tøkt í oktober mánaði 2024. Samstundis verður byrjar við niðurtøku av bygningi á økinum. Eftir tíðarætlanini verður nýggi frítíðarskúlin handaður í desember mánaði í 2025 Sí skjal *"Tíðar- og gjaldsætlan"*

Til verkætlanina eru tøkar kr. 3.578.391. Restfígging er sostatt kr. 13.106.988,24, sum verður at fíggja í fíggjarætlanini 2025.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at heimila umsitingin, at gera sáttmála um heildararbeiðstøku við ArtiCon, sambært omanfyristandandi kostnaði.

Harumframt verður mælt til, at arbeiðið byrjar í oktober 2024. Mælt verður somuleiðis til at játta kr. 3.578.391 av løgukarmi 3175 LK31014 til løgukontu L31014 Nýggj høli til frítíðarskúlan í Kollafirði, og at játtaðar verða kr. 13.107.000 í fíggjarætlanini 2025.

Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Eisini samtykti nevndin at geva umsitingini heimild at samráðast um ískoytisáttmála við Articon um útiøkið og koma aftur í nevnd til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

## 34/24 Verkløg við Hoyvíksvøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 182/20 | 20/01962-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 172/20 | 20/01962-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 212/20 | 20/01962-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 188/20 | 20/01962-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 145/20 | 20/01962-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 236/20 | 20/01962-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.02.2021 | 39/21 | 20/01962-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 15.03.2021 | 62/21 | 20/01962-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 93/21 | 20/01962-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 85/21 | 20/01962-1 |
| 11 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 115/21 | 20/01962-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 162/21 | 20/01962-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 06.04.2022 | 106/22 | 20/01962-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 95/22 | 20/01962-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 87/22 | 20/01962-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 14.02.2024 | 36/24 | 20/01962-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 25/24 | 20/01962-1 |
| 18 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 34/24 | 20/01962-1 |

**Upprunin til málið:**
Samtykt í fíggjarætlanini 2020 løgukonta 5775 upphædd 1.000 tkr. til vøllin í Hoyvík.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Við støði í tøku játtanini til vøllin í Hoyvík í 2020 er hóskandi at fáa ásett, hvussu játtanin skal raðfestast fyri 2020. Málið hevur higartil verið viðgjørt í máli 18/00009 Fótbóltsfelagið FC Hoyvík : Felagshús við Hoyvíksvøll og máli 18/03857 Undrið FF : Virksemi og hølisviðurskifti felagsins**.**

Men av tí at FC Hoyvík trekti aftur umsóknina um fyribils felagshús við Hoyvíksvøll aftur, verður mett meiri yvirskoðiligt at byrja málið av nýggjum.

Felagið skrivaði 27. mai 2020: "Vit fara nú at hugsavna okkum um tað endaligu loysinina, sum Tórshavnar

kommuna hevur samtykt at gera í 2021-22 og har kr. 1 mio. er sett av í 2020 til at fyrireika endaligu loysnina.”

Lýsing av málinum
Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2020 eru avsettar 1.000 tkr. á løgukontu 5775 til vøllin í Hoyvík. Umframt at tað í útmeldaðu langtíðarløguætlanini er lagt upp til fígging til vøllin í Hoyvík í 2021 og 2022. Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 1.000 tkr. til vøllin í Hoyvík, t.e. játtan til at útvega fyribils felagsumstøður og aðrar batar á kringumstøður, umframt ætlaðar 10.000 tkr. til 2021 og 15.000 tkr. til 2022.

**Trappur norðanfyri og aðrar fríðkanir**
Ítróttaanlegg hevur gjørt eina fyribils loysn so viðurskiftini eru forsvarligt, men hevði verið ynskiligt at sett minni upphædd av til ymiskar betranir og fríðkanir av økinum í 2020 ella 21. M.a. við støði í máli 20/00040 Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll.

**Girðing sunnanfyri**
Best var um girðingin var gjørd í 2020 og verður tí mælt til at seta 200 tkr. av av hesi løgujáttan til endamálið saman við somu upphædd á kto. 5717 Ítróttaanlegg. Málið er at arbeiðið er útint í 2020.

**Byggiskrá**
Um ætlanin er at fremja størri byggiverkætlan komandi árini við Hoyvíksvøll við felagshúsi til fótbóltsvirksemi o.a., er hóskandi at fara undir at gera byggiskrá í 2020 ella 21. Hetta kann í høvuðsheitum vera gjørt innanhýsis, men við ávísari ráðgeving. Til endamálið kundu 150 tkr. verið settar av.

**Aðrir tørvin innan ítróttaøkið v.m.**
Mett verður hóskandi at lata ávísa upphædd av hesi løgujáttan vera tøka til møguligar tørvir innan ítróttaøkið. M.a. viðv. máli ‘19/04413 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur’ har ikki øll viðurskifti eru avkláraði enn og kann vera møguligur eykatørvur. Hetta verður ætlandi greitt til komandi eyka fund í nevndini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | Býráðsfundur<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 131<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at samtykkja at játta 200 tkr. til girðing sunnanfyri
b). at taka støðu til um farast skal undir at gera byggiskrá í 2020 ella 2021 til nýtt felagshús við Hoyvíksvøll til fótbóltsfeløgni og annað viðkomandi virksemi
c). at flyta 1.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við a og c í tilmælinum. B verður tikið upp aftur á seinni fundi.

Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at byggiverkætlanin Skúlin á Fløtum verður liðug í næstum er ikki longur brúk fyri byggiplássskúrunum, ið kommunan eigur har á Janusargøtu 15. Talan er um fýra skúreindir á umleið 75 m2 hvør, sum upprunaliga vórðu brúktar sum undirvísingarhøli aftanfyri Sjónleikarahúsið. Harumframt ein vesi-bingja.

Vegna virksemi við og kring Hoyvíksvøll, verður mett áhugavert sum loysn í nøkur ár, at flyta tvær av hesum eindunum og vesi-bingjuna til økið eystanfyri Hoyvíksvøll, at brúka til ymiskan tørv hjá feløgunum

og stovnum, ið virka við og kring Hoyvíksvøll, tó ikki beinleiðis sum felagshøli góðkend av FSF sbrt. vallarreglugerðini.

Ítróttaanlegg kann umsita hølini og gera brúksavtalur við viðkomandi feløg og stovnar.

Til at flyta hesar tvær eindirnar og at gera klárt við fundamenti, íbindingum v.m. verður mett at vera tørvur á umleið 250 tkr. Harumframt er neyðugt at søkja um byggiloyvi.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 250 tkr. av løgujáttani 5775 ætlað Hoyvíksvølli til verkætlan við tveimum skúreindum við Hoyvíksvøll. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við Mentanmálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við Mentamálanevndini og mælur til at onnur, varandi loysn verður funnin á hølisviðurskiftinum við Hoyvíksvøll.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá umboðunum hjá Javnaðarflokkinum: Mælt verður til at finna aðra, varandi loysn á hølisviðurskiftunum við Hoyvíksvøll.

Broytingaruppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marni Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá einari samdari fíggjarnevnd 17. juni 2020 og meirilutanum í fíggjarnevndini 25. juni 2020, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, fimm blonkum og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**:
Skúrar við Hoyvíksvøll
Síðani viðgerðina seinast hevur umsitingin saman við ráðgeva verið í sambandi við byggivaldið um ætlaðu ætlanina. At seta ætlaðu skúreindirnar upp eystanfyri Hoyvíksvøll vil innibera at tað gerst heldur trongt millum íbúðarhúsini og skúrarnar og til vallargirðingina, umframt at tað verður neyðugt við brunaveggi.

Tískil verður mett meiri hóskandi at seta 3 bingjur upp uppá longs t.v.s. bingjur sum eru umleið 10 metrar langar og 4 metrar breiðar. Vansin er tá at ein síða tá skal ein nýggjur útveggur gerast av í hvørjari bingju, umframt at samlaða fermetratalið verður ¼ minni enn ætlað. Til tess verður mett neyðugt at kunna brúka 75 tkr. afturat, umframt upphæddina á 250 tkr., ið longu er játtað. Ætlanin er at gera avtalu við fótbótsfeløgini FC Hoyvík og Undrið FF um brúk av høllunum, umframt møguleiki hjá stovnum í kommununi at fáa ávísa atgongd til hentleikarnar.

Gerð av byggiskrá
Um ætlanin er at fara undir at byggja felagshús við skýli v.m. í 2021 ella 22 er viðkomandi at taka støðu til um farast skal undir at gera byggiskrá fyri eina slíka bygging. Skotið verður upp at játta 100 tkr. til endamálið. Ein byggiskrá verður gjørd í tvørgangandi samstarvi í umsitingini og kemur eisini at inndraga viðkomandi uttanhýsis áhugapartar.

Búskapur
Til Hoyvíksvøll eru 800 tkr. tøkar í ár. 200 tkr. eru játtaðar til girðing sunnanfyri. 250 tkr. játtaðar til skúrar. Í hesum umfari verður skotið upp at játta 50 tkr. eyka til skúrar og 100 tkr. til gerð av byggiskrá. Sostat eru 200 tkr. eftir. Skotið verður upp at tær vera brúktar til fríðkanir og betranarátøk kring leikvøllin. Herundir at tryggja skráan frá p-økinum norðanfyri omanmóti leikvøllinum o.a. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við býarskipanardeildina og inngongur sum partur av tilgongdini at gera betranarátøk fyri trygd og trivna við Karlamagnusar breyt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). At játta 50 tkr. afturat til skúrar
b). At fara undir gerð av byggiskrá fyri einum komandi felagshúsi og játta 100 tkr. til endamálið.
c). At játta 200 tkr. til fríðkanir og betranarátøk kring Hoyvíksvøll.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum tó soleiðis, at loysn við skúrum er fyribils, og at játta nevndu upphæddir av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Annfinn Brekkstein, nevndarformaður, skjýtur upp at broyta verkætlanina við fyribilshølum til felagsvirksemi soleiðis, at staðsetingin verður vestanfyri vøllin, tí loysnin eystanfyri vøllin er ov órógvandi fyri grannarnar.

Umsitingin skal viðmerkja, at hetta krevur nýggja byggimálsviðgerð eins og metast skal um, hvussu slík loysn kann fremjast antin við teim skúrum, sum nú standa eystanfyri, ella aðrari loysn, sum kann fáa longri byggiloyvi enn 2 ár. Roknast skal við ávísum fíggjartørvi í sambandi við broytingina.

Tann varandi loysnin við skýli og felagshølum, ið lúka krøvini hjá FSF, er eisini ætlað at vera vestanfyri. Samtykt er at gera byggiskrá. Mett verður skilagott, um mentamálanevndin eisini tekur støðu til, um hetta arbeiðið skal raðfestast ella útsetast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka støðu til uppskotið og um samtykt, at umsitingin fyrireikar broyttu verkætlanina at leggja aftur fyri nevndina, harundir kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 22. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
**Grannaklaga**

Kommunan fekk í februar 2021 klagu og fyrispurning frá granna við Karlamagnusarbreyt viðv. skipan av økinum eystanfyri Hoyvíksvøll og staðseting av skúrunum.

**Hoyringsfundur við FC Hoyvík og Undrið FF**
Á fundi við feløgini í mars 2021 vóru ætlanirnar við Hoyvíksvøll viðgjørdar við feløgini, og herundir uppskot frá borgarstjóranum um at flyta skúrarnar til økið yvir av p-økinum við Skúlan við Løgmannabreyt. FC Hoyvík mælti staðiliga til at halda fast við eina loysn har skúrarnir standa við sjálvan vøllin, meðan Undrið FF skilti sjónarmiðini hjá FC Hoyvík, men eisini kundi góðtaka loysn við p-økið.

**Uppskot frá borgarstjóranum um broytta loysn**
Heðin Mortensen, borgarstjóri setir fram uppskot um at fáa broytt ætlanina soleiðis at skúrarnir vera settir øðrvísi í økinum. Ein loysn er at 3 skúrar av 4 vera settir norðanfyri atkomuna til vøllin við Karlamagnusarbreyt og ein sunnanfyri og onnur har allir 4 skúrarnir vera settir norðanfyri.

**Innleiðandi metingar hjá umsitingini**
Til at lýsa uppskotið er gjørdar hjáløgdu yvirlitstekningar.

Skúrarnir hava eina frástøðu á umleið 4 metrar frá vallargirðingini og umleið 6 metrar til grannastykkini eystan til. Verður farið inn á økið norðanfyri atkomuna til vøllin vil tað innibera jørð- og betongarbeiðið, so sum grevstur, spreinging/brekking, flyting av tekniskum leiðingum, stuðlamúr v.m. Alt eftir, hvussu langt verður farið norður, gerst arbeiðið dýrari vegna vaksandi hæddarmun. Í verandi støðu er ikki gjørligt at siga neyvt um kostnaðin, men eru á løgukontu 5775 fyri 2021 - 2.500 tkr. tøkar til Hoyvíksvøll og er sannlíkt at verkætlanin væl rúmast innanfyri hesa játtan, men vil neyvari tilgongdin avklárað tað nærri.

Um málið verður samtykt vil ein nýggj verkætlan og kostnaðarmeting kunna vera tøk innan fáar vikur, og er í sofall ætlanin beinanvegin at fara undir tilgongdina við byggimálsviðgerð. Umsitingin metir eisini at ein loysn har 2 skúrar standa hvørjumegin atkomuna, eisini hevði verið viðkomandi at fingið kannað.

Sbrt. galdandi byggisamtykt er loyvt at byggja í geiranum eystanfyri Hoyvíksvøll sbrt. nærri ásetingum og byggiloyvi. Í fall broytingar vera gjørdar er ætlanin at hava kunningarfund fyri feløgunum og grannum um nýggju uppskotini. Í sambandi við arbeiðið norðanfyri atkomuna vera endaligu marknaviðurskiftini við grannastykkini har eisini endaliga avklárað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um at fara undir greining av broyttari staðseting av skúrunum, har 3 ymiskar uppsetingar vera kannaðar og at koma aftur í nevnd til komandi fund við tilmæli um loysn við kostnaðarmeting v.m.

**Mentamálanevndin 15. mars 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
**Skúrar flytast longur norðureftir**
Fyri at fáa praktisku viðurskiftini á staðnum at ganga betri upp er gjørt uppskot til eina nýggja staðseting har skúrarnir eru fluttir nakað longur norður enn upprunaliga hugsað. Henda loysnin gevur fleiri møguleikar fyri ymiskum aktiviteti í økinum eystanfyri Hoyvíksvøll, og er eitt minni inntriv í mun til grannalagið. Sí hjáløgdu tekningar.

Talan er um loysn, ið Ítróttaanlegg hevur arbeitt við saman við ráðgeva. Loysnin inniber eina umskipan av atkomuni til vallarøkið og sum samstundis uppfyllir tørvin bæði fyri vanligari atkomu hjá fólki til gongu og fyri tænastuferðslu hjá Ítróttaanleggum. Tillagaða loysnin hevur fingið byggiloyvi. Loysnin er eisini viðgjørd við fótbóltfeløgini FC Hoyvík og Undrið FF.

Henda loysnin hindrar ikki eina framtíðar skipan av økinum og er ætlanin er at koma við einari dagførdari

heildarætlan fyri økið seinni í ár. Ein ætlan var gjørd í 2018, ið tørvar dagføringar og fáa eina meiri formliga viðgerð. Á løgukarminum fyri 2021 5775 eru 2.500 tkr. ætlaðar Hoyvíksvøll.

Ætlanin er eisini at koma við tilmæli í vár um hóskandi brúk av tøku upphæddini.

Sp/f Røkin hevur longu arbeiðið at gera neyðugar tillagingar fyri at gera skúrarnar og er hóskandi at sama felag kann standa fyri hesum eyka arbeiðinum. Arbeiðið er mett til umleið 385 tkr. og er harumframt tørvur á nakað av fígging til ókent, evt. tilkeyp, flyting av skiftibenrum vesturum og ráðgeving, umframt kommunalt MVG – sett til 430 tkr.

Ætlandi verður farið undir arbeiðið skjótast tilber.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). At fara undir eina tillagaða loysn har skúrarnir við Hoyvíksvøll vera fluttir longur norður.
b). At flyta 2.500 tkr. av løgukarminum 5775 á projektkontu L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Annika Olsen varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Væntandi verður fyribils hølisloysnin við Hoyvíksvøll klár at taka í nýtslu í juli 2021. Sum liður í menning av hentleikunum og funktiónini hevði verið hent við nøkrum grundleggjandi skiftirúmshentleikum í hølunum við brúsu og vesum. Hetta er ynskið frá feløgunum. Mett verður at ein loysn kann gerast fyri 800 tkr. Hugsanin er at fáa heintað inn undirhondsboð frá tveimum veitarum til at gera arbeiðið. Væntandi kann arbeiðið byrja í summar og verða liðugt týðiliga í heyst.

Á projektkontuni fyri verkløg við Hoyvíksvøll er henda upphædd tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um at fara undir gerð av skiftirúmshentleikum í fyribils hølunum við Hoyvíksvøll og at heimila umsitingini at gera sáttmálar innan ein fíggjarkarm á 800 tkr.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Á sumri 2020 samtykti mentamálanevndin at játta 200 tkr. av projektkontu L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll og at sama upphædd skuldi fara av kontu 5717 Ítróttaanlegg.

Á várið 2021 var arbeiðið boðið út og skuldi takast av betra tilboðnum, ið var frá HVT. Tá arbeiðið skuldi fara í gongd bað eigarafelagið um at fáa arbeiðið útsett til út á heystið, hetta tí at annars vildi ampin vera óv stórur tær vikurnar ongin girðing fór at vera. Samskifti dróg út og endin var at HVT ikki vildi standa við tilboðið longur vegna m.a. hækkaðar stálprísir v.m.

Síðani er farið undir at kanna um onnur – meiri byggibar – loysn kann gerast og at fáa tað bjóðað út. Ætlandi verður tað nú í apríl 2022 og er so ætlanin at gera arbeiðið skjótast tilber.

Á projektkontu L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll eru umleið 800 tkr. tøkar. Arbeiðið við lonunum er ikki liðugt uppgjørt, men verður eitt sindur hægri enn áður mett.

Á kontuni er áður ætlað at brúka 100 tkr. til gerð av byggiskrá. Stórur tørvur er í økinum at fríðkað um, jarðfesta skráar v.m.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at bjóðað arbeiðið út av nýggjum og at gera sáttmála fyri upp til 600 tkr. At játta av projektkontu L57034.

**Mentamálanevndin 06. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanarkonto L57034 hevði í 2023 eina restjáttan, sum var eyðmerkt til at skifta hegnið á suðurendanum út, við nýtt hægri hegn. Verkætlanarroknskapurin vísir eitt undirskot á -98.000 kr. Hetta kann verða fíggjað av karmi 5775.
Avrátt varð, at arbeiðið í sambandi við hesa verkætlanina skuldi fara fram, samstundis sum arbeiðið at skifta graslíki og javna vøllin varð gjørt. Nýggja hegnið er sostatt sett upp og verkætlanin er liðug.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

1. At loka løgukonto L57034, Verkløg við Hoyvíksvøll.
2. At restfíggingin á -107.305 kr verðar fíggjað av karmi 5775.
3. At beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Mentamálanevndin 14. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanvndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 35/24 Heildarætlan fyri Vestaru bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 41/24 | 23/07326-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 29/24 | 23/07326-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 35/24 | 23/07326-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavn er í støðugari menning, bæði sum høvuðsstaður føroyinga og bú- og virkisstaður hjá borgarum og vinnurekandi í býnum. Havnin hevur stóra ábyrgd sum landsins søguligi og landafrøðiligi miðdepil, og tískil er eisini neyðugt og týdningarmikið støðugt at fylgja við og menna býin til at rúma mennandi og vaksandi virkseminum í býnum. Menningin og framburðurin eigur at fáa tað rúmd, sum skal til, men er eisini av alstórum týdningi, at virðismikil søgulig spor verða varðveitt á ein skynsaman hátt.

Vestara bryggja, sum einans liggur einar 3-400 metrar frá Vaglinum, hevur eitt stórt potentiali fyri menning, soleiðis at økið í síni heild verður meiri virkið. Í dag liggur stórur partur av økinum óvirkin, grundað óhóskandi hølisumstøður osfr. Tí er av stórum týdningi, at farið verður undir at umrøða, planleggja og taka støðu til, hvussu økið skal mennast komandi 20 árini.

**Lýsing av málinum**
Hóast býurin í síni heild hevur verið í støðugari menning, so er tað sjón fyri søgn, at Vestara Bryggja er tann mest órørdi økisparturin av býnum. Vestara Bryggja er í dag mest sum einans við vinnuligum- og smábátavirksemi. Tó kom Sjóvinnuhúsið við blandaðum virksemi og partar av Bacalao við ítróttarvirksemi, gransking og smávinnu fyri fáum árum síðani, og setti henda broyting gongd á tankarnar um, hvat potentiali økið hevur fyri býin og borgararnar sum heild.

Í 2012 lat Hans Mortensen, virkisstjori, handilsmaður og íverksetari, og fyrrverandi býararkitektur Gunnar Hoydal gera visjónsætlanina “Havnin innanfyri Stóragarð”. Í hesum visjónsskjalinum verður skrivað soleiðis um Vestaru Bryggju,

> *“Økið á Vestaru bryggju er 8-10 ferðir so stórt sum Skálatrøð og er ikki minni áhugavert í býarheildini. Men onkursvegna tykist tað í løtuni at halda ondini og bíða eftir at vita, hvat nú skal henda”*.

Í dag, 12 ár seinni, tykiskt tað enn, sum um vit bíða eftir, hvat skal henda. Bygningar standa tómir, borgarar, áhugabólkar og onnur hava varnast potentialið í hesum býarøkinum, og trokar ynski meiri og meiri um at finna fram til, hvat økið skal brúkast til í framtíðini. Og verður kommunan javnan spurd, hvørjar ætlanir Tórshavnar kommuna saman við Tórshavnar havn hevur fyri økið.

Søguliga hevur økið, síðani tað varð inntikið og gjørt til eitt tað fyrsta vinnuøkið í býnum, virkað við bátasmíð, skipasmiðju, fiskacentrali, frystigoymslu, saltsølu v.m. Og grundað á hesa vinnuligu søguna, so er av alstórum týdningi, at tað verður farið hóvliga fram, soleiðis at framtíðar visjónin fyri økið í síni heild tekur útgangsstøði í søguni fyri økið. Tó so, so skulu vit eisini tora at hugsa nýtt og øðrvísi, halda møguleikarnar opnar og síggja hetta arbeiðið sum eina visjónsætlan, sum við árunum skal fremjast, soleiðis at býarparturin verður enn meiri virknin, enn hann er í dag. Harumframt verður tørvur á at hugsa økið í beinleiðis samband við býin, fyri at býurin kann gera gagn av økinum og harvið eisini gera tað meiri áhugavert hjá aktørum at virka í.

Økið, sum talan er um, strekkir seg frá Skálatrøð/Müllers Pakhúsi og yvir til bátahylin í Álakeri/Landssjúkrahúsið. Tvs. at talan er um økið, sum liggur niðan fyri J.C. Svaboes gøtu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri økið er innan økispartin B2 í 3. grundumráði, sum ásetir:
*Umráðisparturin verður lagdur til endamál, ið hava við skipaferðslu og fiskiskap at gera og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.*

Harumframt liggur partur av økinum innan økispartin C3 í 3. grundumráði, sum ásetir:
*Umráðisparturin verður lagdur til miðstaðarbygging.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tá farið verður undir eitt sovorðið stórt, týdningarmikið og slóðbrótandi arbeiði, so verður mælt til, at menningararbeiðið og tilgongdin verður skipað demokratiskt, soleiðis at virkandi í økinum, borgarar, verandi og framtíðar áhugapartar gerast partur av tilgongdini.

Mælt verður til, at arbeiðið verður skipað í tveimum fasum, har:

- Fasa 1 fevnir um:
  Innleiðandi arbeiði
  Skráseting
  Gransking
  Hugarok
  Verkstovur
  Virkis-, borgara- og áhugapartaluttøku

  Endamálið við fasu 1 er at savna eitt grundarlag fyri framhaldandi tilgongdini av heildarætlanini.

  Ætlanin er at fara undir fasu 1 sum skjótast, og verður arbeiðið væntandi liðugt til støðutakan áðrenn summarferiuna.

- Fasa 2 fevnir um:
  Ítøkiligu heildarætlanina komandi 20 árini, sum verður ment í samstarvi við ráðgevar

Mælt verður til, at arbeiðið verður lagt til politiska støðutakan ávegis í tilgongdini.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Enn eru eingi ítøkilig viðurskiftir, sum kunnu hava beinleiðis ávirkan á arbeiðið, kannað ella umrødd. Hetta verður alt gjørt í komandi tilgongdini.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tórshavnar havn, sum umsitur stóran part av økinum, sum verkætlanin fevnir um, er stórur aktørur í hesi verkætlanini, og sjálvsagt skulu tey luttaka í hesum arbeiðinum. Harumframt eru aðrir stórir áhugapartar, sum skulu við í ítøkiligu tilgongdina.

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62999 | Fríðkan av býnum | 6275 | | | Heildarætlan fyri Vestaru bryggju | 200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 200.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at farið verður undir innleiðandi arbeiðið (fasu 1) av heildarætlanini fyri Vestaru bryggju, og at úrslitið frá innleiðandi arbeiðinum verður lagt til politiska støðutakan eftirfylgjandi,
- at játtaðar verða kr. 200.000 av kt, 6275, L62999, Fríðkan av býnum, á nýggja verkætlan við heitinum "Heildarætlan fyri Vestaru bryggju", undir kt. 6275
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 36/24 Umsókn til keyp av øki - víðka grundstykki á Tórgarðsgøta 38, matr. nr. 690m, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 42/24 | 23/03633-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 30/24 | 23/03633-4 |
| 3 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 36/24 | 23/03633-4 |

**Upprunin til málið**
Eigarar av matr. nr. 690m hava sent kommununi umsókn um møguligt keyp av lendi til at leggja afturat ogn teirra.

**Lýsing av málinum**
Umsøkjari ynskir at keypa 80m$^2$ av matr. nr. 690a, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, til eina víðkan av egnum grundstykki á matr. nr. 690m. Grundgevingin er, at ynski er at fáa pláss til tveir bilar inni á egnum grundstykki og at kunna byggja eitt bilhús á stykkinum, umframt at bilar, ið parkera á matr. nr. 690a, viðhvørt forða inn- og útkoyring til egnan bústað.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matr. nr. 690m er fevndur av økisásetingini A2 í serstøku byggisamtyktini nr. 7, ið fevnir um lága bústaðarbygging. Sambært grein 4 um útstykkingar stk. b. má einki grundstykki verða minni enn 500m$^2$ til víddar. Matr. nr. 690m er 450m$^2$ til støddar, og er tí einki til hindurs fyri at víðka um matrikulin.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Vanliga verður noktandi svar givið til sølu í almennum útstykkingum, tó kann søla koma fyri, um talan er um heilt serlig viðurskifti. Í hesum føri verður mett, at ein søla ikki hevur nakra ávirkan á útstykkingarætlanina og grannar í økinum, umframt at ein geiri norðanfyri framvegis verður varðveittur.

Ein víðkan av matr. nr. 690m kann harumframt vera við til at bøta um atkomuviðurskiftini og nøktandi parkeringsviðurskifti hjá umsøkjara og eigara av grannaognini matr. nr. 690n, og verður tí mælt til at selja umsøkjara ein part av matr. nr. 690a.

Fyri at kunna varðveita ein natúrligan geira norðan fyri matrikkulin verður mælt til at selja eitt tillagað økið í mun til ynsktu víddina, har bæði tveir bilar og eitt bilhús framvegis rúmast á ognini. Sí kortskjalið við uppskoti til sølu av lendi, ið er áleið 50m$^2$ til støddar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Er umrøtt við byggimálsdeildina og stjórnarskrivstovuna.

**Skjøl**
Kortskjal_Uppskot til sølu av lendi, journal nr. 23/03633-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Møgulig frávik/læattar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
At selja kommunalt lendi hevði verið ein inntøka fyri Tórshavnar kommunu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at selja umsøkjara ein part av matr. nr. 690m sambært kortskjalinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 37/24 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til nýggja kirkju á matr. nr. 115, við Støðlagøtu á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 34/21 | 20/03903-8 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 200/23 | 20/03903-8 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.01.2024 | 10/24 | 20/03903-8 |
| 4 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 18/24 | 20/03903-8 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 39/24 | 20/03903-8 |
| 6 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 37/24 | 20/03903-8 |

**Upprunin til málið**
BRIM arkitektar søkja vegna kirkjuráðið fyri Arga Kirkju um loyvi til at byggja nýggja kirkju á matr. nr. 115, Støðlagøtu á Argjum.

**Lýsing av málinum**
Økið, har kirkjan skal staðsetast, liggur millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri spinnaríið.

Kirkjan er staðsett ovarlaga á stykkinum við parkeringsplássi vestanfyri og tí órørda klettalendinum eystanfyri. Staðsetingin er gjørd við atliti til sermerkta umhvørvið og vegurlagið í økinum. Lendið eystan fyri kirkjuna verður varðveitt í verandi líki í so stóran mun sum gjørligt.

Sambært skipanaruppskotinum er kirkjan 1257 m$^2$ til víddar, tornið er 22 metur høgt og har kirkjuskipið er hægst, er tað 15 metur høgt. Sambært serstøku byggisamtyktini er tað ikki hæddaravmarkingar til kirkjuna ella tornið.

Tornið og kirkjutorgið eru staðsett á feltunum nevnd “P-Pláss” / “Innkoyring”. Sambært serstøku byggisamtyktini fyri øki til kirkju á Argjum, § 4. skal økið skipast sambært tekning nr. 3, stk. 1. ið vísir at kirkjubygningurin skal staðsetast á feltinum “byggifelt og kirkjutorg”.

Sambært skipanar uppskotinum er pláss til 30 parkeringspláss inni á stykkinum og sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu KAP III, §3, stk. 3, b) er kravið at tað skal verða 50 parkeringspláss íalt, víst verður til at nógv kommunal parkeringspláss eru nærhendis kirkjuni. 20 pláss á ovaru síðu av Støðlagøtu, 15 pláss við gamla spinnaríið, 18 pláss í Garðsgøtu og 17 pláss í Heygstúni.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Serstøk byggisamtykt fyri øki til kirkju á Argjum.
D1 í 3. grundumráðið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
- Grundøkið, matr. nr.115, Argir, er 4110 m$^2$ til víddar.
- Bygging í D1-økinum er einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt.
- Friðingarmyndugleikarnir hava góðkent ætlanina at leggja kirkju á økinum eftir Løgtingslóg nr. 48 um náttúrufriðing, §2, stk. 2. nr. 3.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
-

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)** Projekttilfarið er blivið sent til Náttúrufriðingarnevndina fyri Streymoyar Sýslu v/ Finnbogi Midjord, har kommunan biður um at fáa góðkenning av verkætlanini

**Skjøl**
20/03903-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at loyva byggingini av nýggjari kirkju á Argjum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

**Smáar broytingar viðvíkjandi "Lýsing av málinum"**
Økið, har kirkjan skal staðsetast, liggur millum Støðlagøtu og Sandá oman fyri spinnaríið.
Kirkjan er staðsett ovarlaga á stykkinum við parkeringsplássi vestanfyri og tí órørda klettalendinum eystanfyri. Staðsetingin er gjørd við atliti til sermerkta umhvørvið og veðurlagið í økinum. Lendið eystan fyri kirkjuna verður varðveitt í verandi líki í so stóran mun sum gjørligt.

Sambært skipanaruppskotinum er kirkjan 1257 $m^2$ til víddar, tornið er 20 metur høgt, og har kirkjuskipið er hægst, er tað 15 metur høgt. Sambært serstøku byggisamtyktini eru tað ikki hæddaravmarkingar til kirkjuna ella tornið.

Tornið og kirkjutorgið eru staðsett á feltunum nevnd "P-Pláss" / "Innkoyring". Sambært serstøku byggisamtyktini fyri øki til kirkju á Argjum, § 4. skal økið skipast sambært tekning nr. 3, stk. 1, ið vísir, at kirkjubygningurin skal staðsetast á feltinum "byggifelt og kirkjutorg".

Sambært skipanaruppskotinum er pláss til 24 parkeringspláss, harav 3 til rørslutarnað, inni á stykkinum, Sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu KAP III, § 3, stk. 3, b) er kravið, at tað skulu vera 50 parkeringspláss íalt. Víst verður til, at nógv kommunal parkeringspláss eru nærhendis kirkjuni, 20 pláss í ovaru síðu á Støðlagøtu, 15 pláss við gamla spinnaríið, 18 pláss í Garðsgøtu og 17 pláss í Heygstúni.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Yvirfriðingarnevndin tekur ikki málið um kirkjubyggingina á Argjum uppaftur. Avgerðin hjá nevndini tann 26. oktober 2021 verður tí standandi. Avgerðin er ikki at friða økið við Sandá.

**Skjøl**
20/03903-20: Serstøk byggisamtykt fyri øki til Kirkju á Argjum
20/03903-23: Forprosjekt – Teknings- og skjalayvirlit.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at loyva byggingini av nýggjari kirkju á Argjum við treytum, sum umsitingin setir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Útsett til komandi fund.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. januar 2024:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Jákup Dam og Súsanna Olsen, samtykti at beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, mælir til at útskriva byggiloyvi.

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Umsóknin um bygging av nýggjari kirkju á matr. nr. 115 við Støðlagøtu á Argjum, er í samsvari við almennu byggisamtyktina, serstøku byggisamtyktina, byggilógina og BK17, og harumframt hava friðingar- og yvirfriðingarnevndin givið loyvi til at byggja kirkju í økinum. Umsóknin lýkur soleiðis allar ásetingar og krøv.

Kommunala viðgerðin av byggiloyvum er skipað og bundin av reglum, soleiðis at skilja, at um ein umsókn samsvarar við allar ásetingar og krøv, so hevur umsøkjarin krav uppá at fáa útskrivað byggiloyvi.

Í almenninginum er seinastu tíðina ivi sáddur um, hvørt kommunan ger seg inn á tinglýstar treytir, ið upprunaeigararnir settu, tá ið trøðin varð útstykkjað.

Treytirnar í sambandi við útstykkingina eru tinglýstar í 1975, og tykist talan vera um vanligar útstykkingartreytir, ið kommunur seta í sambandi við privatar útstykkingar.

Talan er um byggitreytir við 13 greinum, har § 1 nágreinar økið, ið byggireglurnar fevna um, og har § 5 snýr seg um, hvussu økið verður sundurbýtt í 3 øki, sum eru hesi:

1. Fram við nýggja Koyrivegnunum verða løgd 75 grundøki.
2. Niðanfyri Traðargøtu verður øki lagt av til handilsmiðstøð ella annað endamál.
3. Tað sum eftir er av samlaða økinum, sum nevnt undir § 1, verður lagt av til fríøki.

Ført hevur verið fram, at fríøkið nevnt í pkt. 3 í § 5 er tinglýst servituttbindandi sum fríøki, men er hetta ikki rætt. Ásett er í § 13 í byggitreytunum, at *"Ásetingarnar í § 6 og út verða at tinglesa á alt útstykkingarøkið. Átalurætt hava bygdaráðið og granni mótvegis granna".*

So statt er § 5, ið nágreinar tey trý økini í útstykkingini, ikki tinglýst servituttbindandi.

Hinvegin er § 12 tinglýst servituttbindandi, og har er ásett, at *"Øki til veg, bilstøðlar, frítt øki, spælipláss, kloakkir, leidningar, o.a. eins og reinsibrunnur, reinsiverk við frárensli verða beinanvegin, sum byggibúningin er lokin, at leggja út sum almenn ogn uttan endurgjald av nøkrum slagi. Bygdaráðið og útstykkjarnir eru samdir um, at kommunan átekur sær alt viðlíkahald."*

Ásetingin í § 12 er vanlig áseting, ið er áløgd av kommununi í helst øllum privatum útstykkingum, har kommunan tilskilar sær rætt til fyrst og fremst at yvirtaka vegøkini í útstykkingunum umframt allar leiðingar, og at kommunan síðani átekur sær viðlíkahaldið av hesum. Í hesum føri hevur kommunan eisini tilskilað sær rætt til at yvirtaka alt annað, ið skal liggja sum almenn ogn, so sum spælipláss og fríøki. Og við yvirtøkuni fylgir eisini viðlíkahaldsskyldan av hesum økjum.

Tá ið kommunan seinni ger eina byggisamtykt, ið broytir ásetingarnar fyri part av økinum, ið kommunan hevur yvirtikið eftir § 12 í skeytinum, so er talan ikki um at gera seg inn á ein tinglýstan servitutt, sum ásetur, at júst hetta økið skal vera fríøki. § 12 snýr seg bert um rættin/skylduna hjá kommununi at yvirtaka nevndu øki, herundir viðlíkahaldið av nevndu økjum, tá ið *"byggibúningin er lokin"*, sum tað stendur í § 12.

Tað er tískil ikki rætt, tá ið ført verður fram, at kommunan við at broyta ásetingarnar í byggisamtykt fyri økið fram við Sandá ger seg inn á tinglýstan servitutt, sum grannar kunnu átala.

Ein byggisamtykt ger annars upp við tær ásetingar, ið ikki kunnu samvirka saman við byggisamtyktini, og skuldi talan verið um ein servitutt, sum ikki kann samvirka saman við góðkendari byggisamtykt, so fellur servitutturin burtur. Hetta er ásett í § 10, stk. 1 í Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, ið er soljóðandi:

*"Góðkenda byggisamtykt skulu virða ikki bara teir, ið ognina eiga og nýta, men eisini teir, sum í henni eiga veð og aðrar, sum rættindi í henni hava, uttan mark fyri, nær ið hesi rættindi eru fingin."*

Byggisamtyktir verða støðugt broyttar, og hóast eitt øki í dag er útlagt sum fríøki, so kann hetta broytast og leggjast út sum byggiøki – og øvugt – um mett verður, at hetta er býarskipanarliga skynsamt, og um byggisamtyktin verður góðkend av myndugleikunum, ið skulu tryggja, at alt er farið rætt fram í sambandi við arbeiðið at gera byggisamtyktina.

Í málslýsingini frá 2010 í sambandi við viðgerðina av serstøku byggisamtyktini fyri økið til nýggja kirkju á Argjum, verður víst á, at mótmæli eru komin inn, sum vísa á, *"at sambært útstykkingarætlanini Müllerstrøð skuldi økið millum Sandá og Støðlagøtu verða fríøki."*

Tað er sostatt ikki dult, at tað í upprunaligu útstykkingarætlanini hevur verið ætlanin, at økið skuldi liggja sum fríøki, men hóast hetta, samtykti ein meiriluti av býráðnum at broyta byggisamtyktina, so kirkja kann byggjast á økinum.

Harumframt hevur fyrisitingin fyrihildið seg til júst hesa áseting í sínum viðmerkingum í málslýsingini, og so statt ber heldur ikki hesum viðvíkjandi til at siga, at upplýsingar eru duldir, og at málið ikki er upplýst.

Samanumtikið skal fyrisitingin vísa á, at mett verður, at fyriliggjandi umsókn um byggiloyvi lýkur allar treytir at fáa byggiloyvi, og at byggivaldið tískil hevur skyldu til, og umsøkjarin krav upp á, at fáa útskrivað byggiloyvi til ætlaðu byggingina.

Harumframt skal samanumtikið verða víst á, at tað ikki verður mett, at kommunan gjørdi seg inn á tinglýstan servitutt við at broyta byggisamtyktina fyri økið i 2011.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at staðfesta avgerðina um at skriva út byggiloyvi við treytum um:

- at økið uttan um kirkjuna verður endurskapað, soleiðis sum tekningarnar, sum liggja við umsóknini um byggiloyvi, vísa.

Og annars við treytum sum umsitingin setur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Atkvøtt varð um málið.

Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen atkvøða blankt.

Súsanna Olsen, atkvøður ímóti.

Annfinn Brekkstein og Jákup Dam taka undir við tilmælinum, og Jákup Dam krevur málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Heðin Mortensen setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at veitt verður kirkjuráðnum á Argjum byggiloyvi til nýggjan kirkjubygning treytað av, at farið verður ikki undir jørðarbeiðið, fyrrenn ein fullfíggjað kostnaðar-, tíðar-, og byggiætlan fyriliggur fyri allari bygginini. Nærri treytir hesum viðvíkjandi verða at áseta av byggivaldinum.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Heðini Mortensen, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og 5 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam, Jákup Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Kristianna Winther Poulsen,Turið Horn, Jón Kragesteen, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

# 38/24 Vegaatkoma til 72A og 72B við Marknagilsvegin - Vegur 4 og 5 á matr. nr. 1216a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.02.2024 | 13/24 | 24/00711-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 31/24 | 24/00711-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 38/24 | 24/00711-1 |

**Upprunin til málið**
Avtala er gjørd millum Tórshavnar kommunu og ánaran av matr.nr. 1216a, um m.a. at kommunan skal gera veg frá privata útstykkingarvegnum og oman til ognirnar Marknagilsvegur 72A og 72B, soleiðis at atkoman til ognirnar verður flutt burtur frá Marknagilsvegnum.

**Lýsing av málinum**
Nú vegagerðin á ognini 1216a frá Kerjagøtu er byrjað, er áheitan komin frá ánarunum um at fáa vegin, sum kommuna hevur bundið seg til at gera, gjørdan um somu leið.

Maskingrevstur, sum er arbeiðstakari á staðnum, hevur latið kommununi tilboð uppá tann partin, sum kommunan skal gera. Tilboðið er grundað á somu einleikaprísir, ið eru brúktir til vegagerðina sum er í gerð.

Tilboðið er 2.050.000 kr. v. kMVG.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
24/00711-4 Sagsnr 2001106 - matr nr 1216 a Tórshavn - Gullak Madsen - Fundarfrágreiðing.msg
24/00711-3 Kort.pdf
24/00711-2 Avtala.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐

| | Býráðsfundur<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 148<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 8175 | LK81999 | Vegaverk-ætlanir | 8175 | | | Kerjagøta kommunali parturin | 2.050.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At játtaðar verða kr. 2.050.000 av konto 8175, Vegagerðir, LK811999, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Kerjagøta kommunali parturin"
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 39/24 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 70/21 | 21/02196-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 297/21 | 21/02196-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 302/21 | 21/02196-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 37/22 | 21/02196-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 120/22 | 21/02196-2 |
| 9 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 99/22 | 21/02196-2 |
| 10 Fíggjarnevndin | 12.05.2022 | 123/22 | 21/02196-2 |
| 11 Býráðsfundur | 12.05.2022 | 104/22 | 21/02196-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 03.10.2022 | 60/22 | 21/02196-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.10.2022 | 253/22 | 21/02196-2 |
| 14 Býráðsfundur | 27.10.2022 | 244/22 | 21/02196-2 |
| 15 Býráðsfundur | 24.11.2022 | 265/22 | 21/02196-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 20.12.2022 | 76/22 | 21/02196-2 |
| 17 Fíggjarnevndin | 21.12.2022 | 329/22 | 21/02196-2 |
| 18 Býráðsfundur | 21.12.2022 | 302/22 | 21/02196-2 |
| 19 Tekniska nevnd | 19.06.2023 | 34/23 | 21/02196-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 198/23 | 21/02196-2 |
| 21 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 163/23 | 21/02196-2 |
| 22 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 189/23 | 21/02196-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 27.02.2024 | 15/24 | 21/02196-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 54/24 | 21/02196-2 |
| 25 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 39/24 | 21/02196-2 |
| 26 Tekniska nevnd | | | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel

Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.
- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:

- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4

| | **Býráðsfundur**<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 151<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: juni-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| Upphædd íalt | Á | | | Av | | | Lokað verkætlan | Eykajáttan |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Deild | Verkætlan | | Deild | Verkætlan | | | |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
- at umsitingin fær heimild til at gera byggiskrá fyri heildararbeiðstøku.
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku fyri:
  - Alla verkætlanina samlað,
  - ella fyri vegir og tunnil hvør sær.
- Umsitingin fær játtað ein fíggjarkarm á kr. 1.000.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, L81037, Innkomuvegur kommunali partur, til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyristandandi fyrireikingar.
- Málið soleiðis verður samtykt og beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at partar av vegnum/tunnilin kann bjóðast út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at projektering av tunli og vegum skal gerast, er tørvur á, at umsitingini verður heimilað at gera hesar sáttmálar. Í hesum sambandi er tørvur á einum samlaðum karmi á kr. 3.500.000. Hesin karmur er treyt fyri, at projekteringin av innkomuvegnum og tunli kunnu fremjast og gerast liðug. Skotið verður upp, at afturat teimum kr. 1.000.000 og kr. 751.000, sum áður eru játtaðar og framfluttar frá 2020 til verkætlanina L81037 Innkomuvegur kommunalur partur, verða játtaðar kr. 1.750.000, sum ikki verða avgreiddar av ymiskum øðrum kontum og verkætlanum í 2021:

- 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
- 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
- 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
- 250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við at:

- Umsitingini verður heimilað at gera sáttmálar um projektering av innkomuvegi og tilhoyrandi tunli innan ein samlaðan karm á kr. 3.500.000
- Karmurin til projektering verður fíggjaður av:
  - Verandi tøkari upphædd á L81037 Innkomuvegur kommunalur partur
  - 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
  - 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
  - 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
    250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tekniska nevnd 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið verður fíggjað av íløguætlan fyri 2022 (Innkomuvegur).

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg

**Ískoyti**:
Fyrsti partur av uttara ringvegi, ið er arbeiðsvegur frá á Hjalla til Villingadagsvegin, varð boðin út og lægsta boð à kr. 17.272.128 uttan MVG, hevði Articon.
Fyri at seta arbeiðið í gongd, verður biðið um fylgjandi játtan:

• Tilboð 17.272.128

• Verkætlanarleiðsla, eftirlit og byggileiðsla 1.000.000
• Avleiddar verkætlanir 5.600.000
• 6,25 MVG 1.492.008

Tilsaman 25.364.136

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum frá Articon, at játtaðar verða kr. 25.364.136 til verkætlanina, fyrsti partur av uttara ringvegi, kr. 4.600.000 av LK81037 og kr. 20.764.136 sum eykajáttan og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.
**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at kr. 20.764.136,00 verða játtaðar av mettum meirinntøkum í 2022. Um metingarnar ikki halda, verður fíggingin løgd fyri aftur, møguliga sum lántøka. Málið beint í býráðið sum eykajáttan hvat viðvíkur upphæddini á kr. 20.764.136,00.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Ískoyti:** Fyri at tryggja so stuttan flutning av grevstrartilfarinum sum gjørligt, er gjørt uppskot um avtalu við festaran á Hoyvíkshaganum Norðaripartur um at taka ímóti avlopstilfari, sum ikki verður brúkt í verkætlanini. Fyri hetta skal festarin fáa somu upphædd fyri rúmmeturin, sum annars verður kravdur í tyrvingarplássinum í Húsahaga.

Samlað er talan um ein kostnað á uml. kr. 2.150.000,00, sum ikki er íroknaður í útboðnum og givna tilboðnum ísv. verkætlanina.

Harumframt hevur verkætlanin varandi neiliga ávirkan á raksturin av festinum, tá lendið, sum festið hevur ræði á, verður lagt undir vegin og avleiddar verkætlanir umframt komandi vinnuútstykkingina í økinum. Festarin missir tá bit til seyð, undirlendi til ungneyt umframt fría atkomu til bitið. Harumframt verða skipanirnar av verandi fylgjum og gongum ávirkaðar við eyka avbjóðingum til festaran sum avleiðing. Umsitingin metir og er samd við festaran, at ein eingangssamsýning til festaran á kr. 1.500.000,00 er hóskandi samsýning fyri hesar neiligu ávirkanir á raksturin av festinum.

Avtalurnar við festaran hava við sær, at neyðugt er at hækka játtanina, ið samtykkjast skal við aðru viðgerð, úr kr. 20.764.136,00 upp í kr. 24.424.136,00.

**Tilmæli:** Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at samtykkja uppskotið við aðru viðgerð við teirri broyting, at játtaðar verða kr. 24.424.136,00 av meirinntøkum í 2022 og annars taka undir við fyriliggjandi avtalum við festaran

**Fíggjarnevndin 12. mai 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. mai 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevi kommununar hevur eftir avtalu við kommununa projekterað tunnilin lidnan til høvuðsarbeiðstøku og vegurin frá rundkoyringini við Hvítanesvegin til tunnlismunnan undir Brúnni er projekteraður soleiðis, at geometri og krøv eru gjørd klár til heildararbeiðstøku – her er talan um ein lidnan projekteraðan ráveg, tað vil siga at vegkassin er liðugt projekteraður, meðan yvirbygnaður, leiðingar, avvanding, ljós búgvar o.s.fr. ikki eru liðugprojekterað, men krøvini fyri projektering av teimum eru sett upp.

Neyðugt er, at arbeiðstøkurnar fyri tunnil og veg fylgjast, soleiðis at tilfar úr tunlinum í mestan mun kann verða flutt beinleiðis úr tunlinum til vegin. Eisini verður mett, at tað er ein avgerandi fyrimunur fyri logistikkin

í samlaðu verkætlanini um einans ein arbeiðstakari er fyri bæði tunnil og veg. Hetta krevur, at útboð og lisitatión fyri tunnil og veg eru samtundis.

Tunnilsgerðin inniber nógv arbeiði í sambandi við vatntrygging og bergtrygging, sum hóast tunnil hevði verið heildararbeiðstøka, helst høvdu verið avroknað øðrvísi. Tí verður mælt til, at tunnilin verður boðin út sum høvuðsarbeiðstøka. Vegurin, hinvegin, er betri egnaður at bjóða út sum heildararbeiðstøka, men vil hesin útboðsformurin krevja longri tíð, áðrenn lisitatión kann haldast fyri hesa arbeiðstøkuna. Hesi viðurskifti gera, at mett verður at besti útboðsháttur fyri samlaðu verkætlanina er, at tunnil og rávegur verða boðin út fyrst, sum høvuðsarbeiðstøka, meðan vegurin verður liðugt projekteraður til útboð til høvuðsarbeiðstøku.

Mett verður at hetta projekteringsarbeiðið saman við neyðugum kanningum verður gjørt innan ein karm á kr. 1.500.000,-. Undir hesum eru eisini neyðugar støðukanningar av verandi brúgvum, sum framhaldandi verða partur av uttara ringvegi, og projektering av broytingum av hesum brúgvunum. Hetta arbeiðið verður mett at kostað um kr. 350.000,-.

Arbeiðið verður mett at verða liðugt og klárt at bjóða út um ársenda 2022. Tó eigur at verða sett tann treyt, at farast kann ikki undir projekteringina av lidnum vegi, áðrenn Tórshavnar býráð hevur samtykt at fara undir tunnil og veg, sum lýst omanfyri.

Tó eigur at kunna farast undir at gera støðukanningar av brúgvunum beinanvegin og projektera broytingar av teimum í mun til lidnan veg.

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 8175 | 81037 | Innkomuvegur | |

| Upphædd |
|---|
| 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 1.500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2022/2023 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til, at samtykt verður at heimila umsitingini at:

1. Bjóða ráveg og tunnil út sum høvuðsarbeiðstøku
2. Gera sáttmála við ráðgevan um detailprojektering av vegaverkætlan frá rundkoyringini við Hvítanes til Tunnilsmunnan undir Brúnni innan eina rammujáttan á kr. 1.500.000,-, treytað av at Tórshavnar býráð samtykkir at taka av tilboði um ráveg og høvuðsarbeiðstøku. Tó eru støðumeting og projektering av broytingum av verandi brúgvum undantikin hesi treyt innan eina kostnaðarrammu upp til kr. 350.000,-
3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (íløgur), L81037 Innkomuvegur

**Tekniska nevnd 03. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2022:** Samtykt at taka undir við Teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. november 2022:** Heðin Mortensen legði fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til at taka undir við málinum sum samtykt við fyrstu viðgerð við teirri broyting, at pkt. 3 verður soljóðandi:

«3. at peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir (Íløgur), L81037 Innkomuvegur, av inntøkum frá avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan ringveg í Tgórshavn, frá 26. mai 2021.»

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

Uppskotið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti**
Tann 1. desember 2022 varð lisitiatión um arbeiðið at gera tunnil og ráveg. Inn komu tilboð frá P/F J & K Petersen og P/F Articon áljóðandi ávikavist kr. 310.396.677,- og kr. 293.055.268,-. Harumframt lat Articon tvey alternativ tilboð inn áljóðandi ávikavist kr. 289.150.373,- og kr. 261.876.066,-. Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðini.

Í stuttum umfata alternativu tilboðini ávikavist eitt fast-prís tilboð upp á arbeiðið, sum lýst í útboðnum og eitt fast-prís tilboð upp á ein styttan tunnil, sum á sunnaru síðuni kemur út við ríðibreytina, og síðani verður rávegur førdur oman í Marknagil.

Umsitingin hevur gjøgnumgingið møguleikarnar saman við ráðgevunum og Articon til tess at røkka bestu loysnini fyri uttara ringveg. Nøktandi loysn er funnin við støði í innkomnu tilboðunum, og tekur henda loysn í størst møguligan mun teknisk og fíggjarlig heildaratlit viðvíkjandi:

1. hvussu tilfar úr tunlinum kann beinast burtur ella verða eitt tilfeingi í øðrum verkætlanum,
2. hvussu loysnin er háttað vegatekniskt í mun til normar og krøv,
3. hvussu loysnin ger seg ikki inn á umhvørvið í nærøkinum,
4. hvørja ávirkan, fylgjur av loysnini hava á umhvørvið aðrastaðni.

Í hesum sambandi hava Tórshavnar kommuna og P/F Articon fyrireikað sáttmála um heildararbeiðstøku við grundarlagi í tilboðnum í alternativi 2 og seinni tilboðstillagingum. Hesin sáttmáli fevnir tá um at gera lidnan veg millum rundkoyringina á Hvítanesi og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð. Hetta er ein samlaður teinur á umleið 6.300 m, har av umleið 1.760 m eru tunnil. Tunnilin kemur at ganga millum Villingardalsvegin, undir Brúnni, til eitt øki millum ríðihøllina hjá Berg hestum og Hotel Føroyar. Her kemur tunnilin út undir ríðibreytini, soleiðis, at hendan verður varðveitt. Sáttmálaupphæddin fyri hesa heildarveiting er kr. 305.015.316,- umframt mvg. Íroknað kommunalt mvg er upphæddin kr. 324.078.773,25.

Ein partur av vegastrekkinum er vegur, sum P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil (EST) upprunaliga skuldu lata gera. Hetta snýr seg um teir fyrstu uml. 1.000 metrarnar av vegnum frá rundkoyringini á Hvítanesi. Í sambandi við at Tórshavnar kommuna skal gera vinnuútstykking á Ovara hjalla, er vorðið greitt, at hetta vegastrekkið við at verða flutt longur oman móti hamarinum gevur eina betri nýtslu av økinum, sum verður lagt av til vinnuútstykking. Tí er fyrireikað avtala við EST um, at Tórshavnar kommuna yvirtekur hetta arbeiðið og sjálvan vegin frá felagnum fyri eina samsýning á kr. 12.923.588,-, sum EST rindar Tórshavnar kommunu. Henda upphædd eigur at verða flutt inn undir L81037 Innkomuvegur, undir deild 8175 Vegir (íløgur)

Eisini er avtala gjørd við EST um keyp av gróti úr Sandoyartunlinum, sum Tórshavnar kommuna m.a. kann nýta í verkætlanini at gera innkomuvegin, vinnuútstykking á Ovara hjalla og møguligum øðrum verkætlanum. Talan er um umleið 200.000 m³ av gróti í føstum máti. Kostnaðurin fyri hetta grót er kr. 10.800.000,-, har av Tórshavnar kommuna skal gjalda EST kr. 5.000.000,- við undirskrift av avtaluni og tær seinastu 5.800.000,- við ársenda 2024. Gjaldið við undirskrift verður tikið av løgukonto L69004 Vinnuútstykking á Ovara hjalla, undir deild 6975, Byggibúning ídnaðarøki (íløgur), sum útlegg.

Áður eru játtaðar kr. 28.924.136,- til projektering og gerð av forkanningum og arbeiðsvegi í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin. Hetta er áður fíggjað og ikki partur av hesum sáttmálanum við Articon.

Sambært avtalu milum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu verður landið at stuðla verkætlanini við kr. 110.000.000,-. Henda avtala er grundað á projekteringar av linjuføringum, íbindingum, rundkoyringum v.m., sum landsverk hevur latið gjørt frammanundan, og sum er í samsvar við samferðsluætlanina hjá landinum 2018-2030. Tórshavnar kommuna hevur, eftir at verkætlanin varð latin til kommununa at skipa, ynskt at broyta verkætlanina, so atlit til framtíðarverkætlanir hjá landinum, sum Tórshavnar kommuna ikki væntar verða framdar í næstum, verða útsett í avtaluni. Sambært verandi avtalu eiga kr. 53.600.000,- at verða útgoldnar pr. 2023.

Sáttmálin fyri framman við P/F Articon er somuleiðis grundaður á, at hesi atlit verða útsett. Fyri at tryggja, at stuðulin frá landinum hóast broytingarnar framhaldandi verður veittur kommununi, varð broytingaruppskot borðið í Løgtingið í november 2022, men bleiv tað ikki viðgjørt vegna løgtingsvalið í desember 2022. Eftir ætlan verður uppskotið við broytingum tillagað verkætlanini fyri framman og lagt aftur fyri Løgtingið, tá tað kemur saman aftur.

Á fíggjarætlan Tórshavnar kommunu fyri 2023 eru avsettar kr. 108.000.000 í úttreiðslujáttan og kr. 33.500.000 sum inntøkujáttan frá stuðlinum frá landinum.

Henda upphædd verður tó regulerað í mun til ta framdrift, sum verkætlanin kemur at hava í 2023, sambært projekteringini og tilhoyrandi gjaldsætlanini, sum Articon skal undir at gera.

**Skjøl**
Skjølini verða løgd fram á nevndarfundinum.

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 108.000.000,- |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 324.078.773,25 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.500.000 |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla nevndini til:

1. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Articon um heildararbeiðstøku við føstum prísi at gera vegastrekkið millum rundkoyringina á Hvítanesi og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð íroknað tunnil undir Húsareyni áljóðandi kr. 324.078.773,25 íroknað mvg. Tryggjast skal, at stuðulin frá landinum áljóðandi kr. 110.000.000,- kann veitast verkætlanini.

2. at arbeiðið sambært sáttmálanum við P/F Articon í 2023 verður fíggjað við kr. 108.000.000,- av løgukarminum LK 81037 Innkomuvegur undir 8175 Vegir (íløgur), og restin av játtanini verður at fíggja í 2024.
3. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um yvirtøku av vegastrekki á Ovara hjalla, og at inntøkan frá hesari yvirtøku kr. 12.923.588,- verður flutt á L81037 Innkomuvegur undir deild 8175 Vegir (íløgur).
4. at sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um keyp av gróti frá sandoyartunlinum fyri eina upphædd á kr. 10.800.000,-, har av kr. 5.000.000 verða goldnar við undirskrift. Hetta verður at fíggja við útleggi av konto L69004 Vinnuútstykking Ovari hjalli undir deild 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur).
   at málið verður beint víðari í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. desember 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. desember 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 21. desember 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, einari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Kristian Martin Skála og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddi :Elsa Berg.

Blankt atkvøddu: Ruth Vang og Turið Horn.

**Ískoyti:**
Í hjáverandi ískoyti verða hesi viðurskifti tikin til viðgerðar:

- **Byggiharraútreiðslur**: Tann 5. juni 2023 var mál 23/02456 «Fígging til avleiddar útreiðslur í samband við heildarætlan, gerð av tunli og innkomuvegi» til viðgerðar í teknisku nevnd, og málið varð samtykt. Her var tilmælið soljóðandi:
    - Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
        - at játta kr. 9.000.000 til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin og kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.
        - at peningurin verður játtaður av løgukarmi LK81037 Innkomuvegur til løgujáttan L81037 Innkomuvegur
        - At játtaðar verða kr. 12.200.000,- sum eykajáttan til løgukarmin LK 81037 Innkomuvegur.
        - At málið verður beint víðari umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir

  Vegna samanhangin við samlaðu játtina til innkomuvegin verður hetta málið tikið til umrøðu í hjáverandi máli og hiðani beint víðari til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina. Niðanfyri verða eisini tillagingar til hesa viðgerð lýstar, at taka støðu til, sum umfata átroðkandi viðurskiftir í sambandi við lendisræði. Hetta hevur týdning fyri framdriftina av arbeiðinum, soleiðis at tíðarætlanin heldur.

- **Regulering av játtan:** Í ískoytinum, sum varð samtykt í býráðnum tann 21. desember 2022 varð samtykt at gera sáttmála við P/F Articon um heildararbeiðstøku fyri tkr. 324.078. Í somu viðgerð varð samtykt, at arbeiðið í 2023 skuldi fíggjast við tkr. 108.000 av løgukarminum LK81037 Innkomuvegur. Í málslýsingini veður sagt: «Henda upphædd verður tó regulerað í mun til ta framdrift, sum verkætlanin kemur at hava í 2023, sambært projekteringini og tilhoyrandi

gjaldsætlanini, sum Articon skal undir at gera.». Í apríl 2023 hevur umsitingin fingið latið prosjekt, tíðar- og gjaldsætlan frá P/F Articon. Her kann staðfestast, at fyritøkan vil gera arbeiðið skjótari enn áður lagt upp fyri. Tíðarætlanin staðfestir, at arbeiðið skal verða liðugt 1. november 2024. Sostatt verður sáttmálaupphæddin avgreidd innan 21 mánaðir, har størsti parturin liggur í 2023, tá stóra spreingiarbeiðið í tunlinum verður framt. Tí verður, um framdriftin av verkætlanini skal haldast, neyðugt at útvega størri játtan fyri 2023, enn áður samtykt.

Afturat byggiharraútreiðslunum, sum blivu samtyktar á fundi í teknisku nevnd tann 5. juni, hevur arbeiðstakarin biðið um, at lendið millum ríðibreytina, matrikul 1175h (Hotel Føroyar) og matrikul 1160a (Flatnahagin) verður tøkt í sambandi við grevstrararbeiði til inntakið av tunlinum í Marknagili. Her er talan um 15.000 m² í matr. 1175a (Húsahagi). Fyritøkan hevur tørv á hesum lendinum til atkomu og byggipláss. Samlað verður í fyrstu atløgu biðið um at leiga alt lendið, og verður tað mett, at hetta kann gerast fyri kostnað á kr. 150.000,-. Seinni í verkætlanini verður eisini neyðugt at keypa nakað av hesum lendinum (uml. 11.000 m²), men verður hetta lagt fram, tá hetta gerst aktuelt.

Samanlagt verður tí tørvur á, at játtaðar verða tkr. 9.150 til hetta. Framhaldandi er tørvur á kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.

Eisini skal herumframt vísast á, at í sambandi við heildararbeiðstøkur kunnu javnan uppstanda støður, sum gera, at byggiánarin skal taka á seg óvæntaðar útreiðslur av ymiskum slag, sum ikki eru íroknaðar sjálvan sáttmálan um heildararbeiðstøkuna. Ofta er skotbráið fyri hesum útreiðslum stutt, og drál kann viðføra seinkingar og eykarokningar. Tað er trupult at meta um hesar útreiðslur frammanundan, men vanliga verða uml 20% sett av til hetta endamál. Av tí at talan er um heildararbeiðstøku, metir umsitingin, at í miðal uml. 1 mió. kr. um mánaðan er hóskandi. Hetta svarar til áleið 6,8% av sáttmálaupphæddini, ella 22 mió kr í alt (14.270.000 fyri 2023). Hetta er upphædd, sum hædd eigur at verða tikin fyri, um fíggjarætlanin fyri 2023 skal hækkast við lántøku í sambandi við ta frá arbeiðstakaranum upplýstu framdriftina í verkætlanini í mun til uppruna metingarnar.

Í sambandi við reguleringarnar av játtanini í mun til virksemið á verkætlanini skal vísast á, at samlaði tørvurin fyri verkætlanina í 2023 er kr. 238.444.000, tá er ikki roknað við, at sambært fíggjarlóg landsins fyri 2023 eru frá landinum settar kr. 23.000.000 av til fíggjarligan stuðul til verkætlanina. Fyri árini 2024, 2025 og 2026 eru avsettar ávíkavist 31 mió. kr., 36 mió. kr. og 20. mió. kr í stuðli frá landinum. Á fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu eru fyri 2023 avsettar kr. 108.000.000,-. Hetta merkir, at íroknað stuðul frá landinum resta kr. 107.440.000 í í mun til tørvin í 2023, sum er kr. 215.440.000,-. Um stuðulin frá landinum ikki er íroknaður er upphæddin kr. 130.440.000,-. Mett verður, at neyðugt er, at kommunan tryggjar sær, at øll upphæddin kr. 130.440.000,- er tøk, fyri at vandi ikki er fyri, at arbeiðið steðgar vegna væntandi gjaldføri.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | Eykajáttan | 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | | 130.440.000 |
| 8175 | LK81037 | Innkomuvegur | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 130.440.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 390.943.909,25 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |

| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |
|---|---|---|

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At samtyktin hjá teknisku nevnd frá 5. juni 2023 verður trekt aftur.
- At fíggjarætlanin fyri 2023 verður hækkað kr. 130.440.000,- við eykajáttan, sum verður fíggjað við lántøku, og henda hækking verður veitt løgukarminum LK81037 innkomuvegur undir deild 8175 Vegir (íløgur).
- At játta kr. 9.150.000 til byggiharraútreiðslur í sambandi við verkætlanina at gera innkomuvegin og kr. 3.200.000,- til eykaútreiðslur í sambandi við yvirgongd frá arbeiðstøku at gera arbeiðsveg til heildararbeiðstøku at gera innkomuveg.
- At játta kr. 22.000.000 til óvæntaðar byggiharraútreiðslur, harav kr. 14.270.000 verða veittar av LK81037 Innkomuvegur í 2023 á L81037 Innkomuvegur og kr. 7.830.000 verða veittar í 2024 av LK81037 Innkomuvegur
- At málið verður beint víðari umvegis fíggjarnevndina í býráðið til tvær viðgerðir.

**Tekniska nevnd 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið krevur tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við málinum.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

Málið samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongar blankari atkvøðu við aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Anja Hartmann Wardum, Turid Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti**
Arbeiðið við innkomuvegnum gongur væl, og skjótt skal arbeiðstakarin undir at byrja arbeiðið at gera íbindingina í Marknagilsvegin. Av tí at íbindingin í Marknagilsvegin er ávirkað av íbindingunum í

Dánjalstrøð, Kerjagøtu og íbindingunum íroknað ferðsluljós við Skúlaheimið, Glasir og Skúlan á Fløtum, var hendan íbindingin ikki liðugt prosjekterað, áðrenn sáttmálin um innkomuvegin varð undirskrivaður.

Nú er íbindingin liðugt prosjekterað, og Articon hevur bjóðað sær at gera arbeiðið fyri ein meirkostnað á 19,4 mió. kr. Sí tekning j. nr. 21/02196-1297.

Umsitingin hevur gjøgnumgingið tilboðið frá Articon, sí j.nr.: 21/02196-1298, og metir, at kostnaðurin er í samsvari við teir eindarkostnaðir, upprunaliga tilboðið hevði. Aftrat kemur MVG, indeks og óvist, sum er 3 mió. kr. Samlað upphædd er sostatt 22,4 mió kr., sum verður fíggjað við lántøku.

**Skjøl**
21/02196-1297 D1042 Íbinding, Marknagilsvegur Planur og longdarskurður (1)
21/02196-1298 Tilboð 23-11-2023 Marknagilskrossurin.pdf

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til at játta 22,4 mió. kr. sum eykajáttan fíggjað við lántøku til løgukonto L81037, og heimila umsitingini at gera sáttmála við Articon um gerð av íbinding í Marknagil, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 40/24 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 102/22 | 22/01377-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 33/22 | 22/01377-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 154/22 | 22/01377-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 20.06.2022 | 50/22 | 22/01377-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 186/22 | 22/01377-1 |
| 8 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 157/22 | 22/01377-1 |
| 9 Býráðsfundur | 29.09.2022 | 204/22 | 22/01377-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 19.06.2023 | 114/23 | 22/01377-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 19.06.2023 | 36/23 | 22/01377-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 202/23 | 22/01377-1 |
| 13 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 170/23 | 22/01377-1 |
| 14 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 191/23 | 22/01377-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 27.02.2024 | 16/24 | 22/01377-1 |
| 16 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 55/24 | 22/01377-1 |
| 17 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 40/24 | 22/01377-1 |
| 18 Tekniska nevnd | | | 22/01377-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur eftirspurningur er á vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu. Býarskipanarliga er í fyrstu atløgu skilabest at víðka um verandi vinnuøkir, áðrenn farið verður undir at staðseta nýggj økir, hetta fyri at gagnnýta lendið og savna virksemið á einum stað, umframt at infrakervi, leiðingar v.m. longu er á staðnum.

Í løtuni hevur kommunan ongi vinnustykkir á sølulista. Víst verðir á økið omanfyri á Hjalla sum eina eyðsædda nýggja vinnuútstykking, tí hetta økið byggisamtyktarliga longu er eitt vinnuøki, men eisini tí at økið liggur tætt við aðra vinnuútstykking.

**Lýsing av málinum**
Linjuføringin av innkomuvegnum er nú endaliga løgd, og umsitingin mælir til, at leggja eina útstykking sunnan fyri vegin norðan fyri Stórutjørn, sí kortskjal *Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.*

Umsitingin hevur í longri tíð arbeitt við at skipa Stórutjørn sum nýggjan býling við bústøðum, stovnum, ítróttarøki, grønum økjum og lættari vinnu. Arkitektakapping varð hildin í 2020 og í mars 2022 varð ráðgevarasáttmáli undirskrivaður um skipanina av Stórutjørn. Millum økið við Stórutjørn og Vinnuútstykkingina á Hjalla liggur økið Ovari Skarðshjalli. Tað er hetta økið, sum umsitingin mælir til skal gerast til eina nýggja vinnuútstykking í kommununi.

Í sambandi við at Eysturoyartunnilin varð gjørdur, og Tunnilsfelagið hevði til ábyrgd at gera veg til tættasta innkomuveg, so varð vegur gjørdur frá rundkoyringini og allan vegin niðan á hamaran og verður eftir ætlan knýttur í innkomuvegin. Í løtuni er innkomuvegurin í útboði til í fyrsta umfari at gera ein arbeiðsveg allan vegin yvir í Villingadalin. Nýggja vinnuútstykkingin bindir beinleiðis í innkomuvegin, og gerst íbindingin sostatt fyrsta íbindingin norðast á strekkinum.

Umsitingin mælir til, at nýggja vinnuútstykkingin verður ætlað til vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Hetta er bæði grundað á, at tað er týdningarmikið, at vinnan ikki ávirkar býlingsmenningina á Stórutjørn, umframt at mett verður at stórur tørvur er á vinnugrundstykkjum í hesum umhvørvisflokkunum. Lagt verður tí upp til at útleggja vinnuústykkingina sum B4-øki í almennu byggisamtyktini, ið umfatar vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Undir lógir og ásetingar sæst lýsing av umhvørvisflokkunum 2-4.

Tá útstykkingin verður skipað, er tað umráðandi at skipa staðsetingina av virkjunum í mun til vinnuflokkarnar, soleiðis at bústaðarøkið hevur minst møguligan ampa av virkjunum og virkseminum. T.d kundu virkini verið lagað eftir, at tann tyngra vinnan verður staðsett oman móti Skarðshjalla og tann lættara vinnan oman móti ítróttarøkinum og bústaðarøkjunum á Stórutjørn.

Ein leyslig meting av projekteringini fram til høvuðsprojekt liggur á uml. kr. 2 mió. kr. Um farið verður undir at projektera nú í vár, so verður mett, at útstykkingin er klár at bjóða út til arbeiðstakara longu í heyst. Mett verður, at útstykkingin kann verða liðug í 2023-24.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu

*Flokkur 2*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til smávegis ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstaðir og starvstovur. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 20 metur.*

*Flokkur 3*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt umhvørvi, serliga orsakað av uttandura aktiviteti og kunnu staðsetast í ídnaðarøki ella í randarøki, sum minni dálkandi virkir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga virkir sum hava tænastuvirksemi, t.v.s. handverkstaðir, maskinvirkir og bensinstøðir. Minsta frástøðan til bústaðir fyri henda flokk er 50 metrar.*

*Flokkur 4*
*Umfatar virkir, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kunnu staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir, klædnavirkir og bilverkstaðir við sproytukabinu. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 100 metrar.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Neyðugt verður at broyta byggisamtyktina í sambandi við gerð av útstykkingini, og tí verður mælt til at fara undir hesa broyting skjótast.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03588 Nýggj útstykking til vinnustykkir. Umhvørvisflokkur 3 til 7.
18/03468 Skipan av Stórutjørn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/01377-2 Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | **x** | | | **x** |
| **Umhvørvisavleiðingar** | **x** | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | **x** | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒ Nei ☐**

Í málinum 18/03468 Skipan av Stórutjørn varð á býráðsfundi 24.03.2022 samtykt at játta fígging til keyp av lendinum til vinnuútstykkingina, umframt at játta fígging til projektering av vinnuútstykkingini. Tískil verður ikki neyðugt í hesum málinum at fáa fígging til hesi viðurskiftir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við ráðgeva um projektering av vinnustykkjunum á Ovara Skarðshjalla
- at heimila umsitingini at bjóða útstykkingina út, tá projekteringin er liðug, og at gera sáttmála um arbeiðstøkuna.
- at fara undir at broyta byggisamtyktina fyri økið til eitt B4-øki
- at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri viðmerking, at sáttmálin um arbeiðstøkuna verður at leggja fyri aftur avvarðandi nevndir.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at Articon skal gera arbeiðsvegin hjá Innkomuvegnum, sí mál 21/02196, er møguleiki at fáa avgrivið økið til vinnustykkir, ið kommunan hevur ognað sær at útstykkja til vinnustykkir, sí mál 18/03468, við at víðka arbeiðstøkuna av arbeiðsvegnum. Av tí at økið er stórt, uml. 150.000 m$^2$, vísa ávegis metingar, at tað vil kosta áleið 23 mió. kr., og er hesin kostnaður grundaður á eindarkostnaðir hjá arbeiðstakaranum í verandi sáttmála, at gera arbeiðsvegin til Innkomuvegin.

Óvissurnar í sambandi við støðuna í heimunum gera, at mett verður, at møguleikin er stórur fyri, at kostnaðurin kann hækka munandi næstu tíðina. Tí verður somuleiðis mett, at tað er ein fyrimunur fyri Tórshavnar kommunu, at partar av arbeiðinum at fyrireika vinnustykkini kunnu gerast fyri áður givnar eindarkostnaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við Articon at fáa grivið økið av, ið er lagt av til vinnustykkir, soleiðis at allur avgrevstur verður grivin av, og yvirskotið verður koyrt niðan til bóndan.
- at játta 23 mió. kr. av kontu 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldið Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum.
  at beina málið í býráðið, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina, til tvær viðgerðir, tí talan er um eykajáttan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at heimilað verður umsitingini at gera avtalu við Articon sambært tilmælinum og við somu eindarkostnaðum sum eru nýttir í verandi sáttmála um arbeiðsvegin til innkomuvegin

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera innkomuveg er komið væl í gongd, og er farið undir at spreingja tunnilin undir Húsareyni. Í hesum sambandi er tørvur á, at grót úr tunlinum, sum ikki skal fara í vegagerð, kann fáast til høldar so skynsamt og skilvíst sum gjørligt fyri kommununa. Vinnuútstykkingin á Ovara hjalla er væl egnað til at taka móti hesum gróti, samstundis sum tryggjað verður, at grótið verður stuttflutt og einans flutt eina ferð, umframt at tað ikki verður koyrt eftir kommunalum vegum ella landsvegum og har við elvir til óneyðugt slit á hesar vegir.

Umsitingin hevur sáttmála við ráðgeva um at projektera vinnuøkið, og er henda projektering í løtuni í myndugleikafasuni. Henda projektering skal sambært avtaluni leiða til eitt útboð í høvuðsarbeiðstøku. Í skjalinum 22/01377-193 «Dømi uppá Bygging parkering vm 230523» er víst yvirlit yvir høvuðstættirnar í hesi verkætlan. Henda verkætlan er, tá myndugleikaprojektið er góðkent, ætlað at fara víðari til høvuðsprojekt, sum at enda verður boðið út til arbeiðstakarar at fremja sum høvuðsarbeiðstøka. Metast kann, at henda tilgongd kann taka nakað av tíð, áðrenn arbeiðið kann byrja.

Arbeiðstakarin á innkomuvegnum, Articon P/F, hevur víst á tørvin at fáa grótið frá tunlinum undir Húsareyni til høldar skjótast gjørligt, og í hesum sambandi latið kommununi uppskot til heildararbeiðstøku av verkætlanini at gera vinnuøkið. Hetta uppskot verður kunnað um á fundinum.

Vísast kann á, at Articon P/F við heildararbeiðstøkuni at gera vinnuøkið, kann sameina verkætlanina við verkætlanina at gera innkomuvegin og Húsareynstunnilin, sum felagið eisini ger í heildararbeiðstøku. Hetta merkir, at felagið m.a. kann samskipa grótframleiðsluna úr vega- og tunnilsgerðini við annleggsarbeiðini í sambandi við vinnuøkið, sum hevur tørv á gróti.

Í stuttum kann greiðast frá, at størsti munurin millum verkætlanina, sum avtala er gjørd við ráðgeva um, og uppskotini frá Articon P/F, er, at í uppskotinum hjá Articon P/F verða vinnustykkini bundin saman við einum vegi eftir hjallanum, meðan í verkætlanini hjá ráðgevanum er talan um tveir vegir eftir hjallanum. Hetta merkir, at munur er á uppskotunum báðum, bæði tá ræður um væntaðan kostnað, men eisini um, hvussu uppskotini liggja í lendinum. Í uppskotinum hjá Articon P/F verður roknað við lutfalsliga djúpum stykkjum, sum hava ein hæddarmun millum veg og fjarasta lendi á uml. 10 m, sum verður vunnin við, at stykkini bæði oman- og niðanfyri vegin hava hæddarspring á uml. 4 m, 15 m frá vegøkslini og síðani skráar og beni fjarast frá vegnum at taka restina av hæddarmuninum. Í uppskotinum hjá ráðgevanum er roknað við, at stykkir niðanfyri vegirnar hava eitt hæddarspring á uml. 3 m, 15 m frá vegøkslunum og síðani skráar oman av fjarasta endanum. Stykkini omanfyri vegirnar eru á hædd við vegirnar og eru uttan hæddarspring,

men einans við beni og skráum at vinna hæddina upp til lendið fjarast frá vegøksl. Í báðum uppskotum er møguleiki at blanda støddirnar av stykkjunum frá 200-300 $m^2$ til 5000 $m^2$. Eisini ber tá til at leggja størru stykkini saman til enn størri stykkir i báðum uppskotum.

Annar stórur munur á uppskotunum er, at uppskotið frá Articon letur upp fyri optión, har upp til uml. 100.000 $m^2$ av vinnustykkjum verða gjørd í mun til uml. 70.000 $m^2$ í uppskotinum uttan option og uppskotinum frá ráðgevanum. Her er kortini tørvur á, at byggisamtyktin fyri vinnuøkið á Ovara hjalla verður víðkað til at umfata alt ávirkaða økið.

Í tilfarinum, ið verður framlagt á fundinum, er samanbering millum uppskotini í teirra núverðandi skapi gjørd.

Articon P/F hevur bjóðað Tórshavnar kommunu at fremja verkætlanina eftir sínum uppskoti sum heildararbeiðstøku. Samlaður kostnaður fyri hesa heildararbeiðstøku er, íroknað byggiharraútreiðslur til óvæntað, kr. 54.000.000,- íroknað mvg. Afturat hesi upphædd skal roknast við útreiðslum til lendiskeyp av uml 20.000 $m^2$. Her kann roknast við samlaðum útreiðslum upp til kr. 2.000.000,-.

Umsitingin metir samanumtikið, at uppskotini frá ráðgevanum og P/F Articon bæði loysa tørvin á at fáa til vega vinnustykkir í økinum. Uppskotið frá ráðgevanum liggur betri í lendinum, tí tveir vegir verða gjørdir at røkka vinnustykkjunum. Hetta gevur eyka kostnað, sum ikki er í uppskotinum frá P/F Articon, har einans ein vegur er inni á økinum at røkka stykkjunum. Tann eyka vegurin í uppskotinum frá ráðgevanum viðførir ein hægri kostnað fyri verkætlanina á millum 10 og 15 mió. kr. Uppskotið hjá P/F Articon kann setast í verk og fremjast væl skjótari enn uppskotið hjá ráðgevanum, og hevur hetta eisini týdning fyri framdriftina í verkætlanini at gera innkomuvegin. Tí er samlaða metingin, at tikið eigur at vera av tilboðnum frá P/F Articon við optiónini, har 100.000 $m^2$ verða byggibúnaðir.

Tørvur er á, at byggisamtyktin fyri økið verður broytt í samsvar við víddina av økinum, sum skal nýtast til vinnustykkini og í mun til nýtsluna av økinum.

Umframt omanfyri standandi viðurskifti skal her upplýsast, at býráðið tann 21.12.2022 samtykti í máli 21/02196 “Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK – innkomuveg», at «sáttmáli verður gjørdur við P/F Eysturoyar- og Sandoyartunnil um keyp av gróti frá sandoyartunlinum fyri eina upphædd á kr. 11.475,- (íroknað mvg), har av kr. 5.738.000 verða goldnar við undirskrift. Hetta verður at fíggja við útleggi av konto L69004 Vinnuútstykking Ovari hjalli undir deild 6975 Byggibúning ídnaðarøkir (íløgur).» Henda samtykt er ikki viðgjørd í hjáverandi máli, og verður gjørt vart við tað her. Sostatt verður eisini biðið um, at upphæddin verður íroknað samlaðu umbønina í hesum umfari. Somuleiðis hevur verkætlanin «18/03468 Skipan av Stórutjørn (L69003)» goldið fyri keypið av lendinum, og eigur hetta eisini at verða endurrindað. Her er talan um tilsamans kr. 14.430.000,-

Mett verður, at vinnustykkini kunnu seljast fyri kr. 1500,-/m². Hetta er kostnaður, sum endurspeglar kostnaðin at fremja útstykkingina. Fyri at styrkja um gjaldføri kommununar eiga stykkini at verða sett til sølu so skjótt sum gjørligt.

**Skjøl**
22/01377-193 Dømi uppá Bygging parkering vm 230523.pdf
22/01377-196 VOH_Articon uppskot
22/01377-197 VOH_230619_Fíggjaryvirlit

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☐ |
| Eyka játtan | ☒ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6975 | L69004 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | |

| **Upphædd** |
|---|
| 72.917.000,- |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 99.007.000,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023/2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at heimilað verður umsitingini at samráðast við P/F Articon og gera sáttmála um heildararbeiðstøku av vinnustykkjunum á Ovara hjalla.
- at heimilað verður umsitingini at samráðast við Búnaðarstovuna um keyp av neyðugum eyka lendi og gera sáttmála um hetta.
- at omanfyri nevndu arbeiðir og keyp verða gjørd innanfyri ein karm fyri alla verkætlanina á kr. 56.000.000,-
- at játtaðar verða kr. 11.475.000,- til gjald fyri keyp av gróti frá sandoyartunlinum (jvf. Býráðssamtykt frá 21.12.22 í máli 21/02196 "Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK – innkomuveg»).
- at játtaðar verða kr. 14.430.000,- til keyp av lendi frá verkætlanini L69003 "Skipan av Stórutjørn".
- at byggisamtyktin verður broytt soleiðis, at økið, sum byggisamtyktin umfatar, samsvarar við vinnuútsykkingina.
- at heimilað verður umsitingini at fara undir at selja vinnustykkini fyri í minsta lagi ein fermetrakostnað á kr. 1500,-
- at samlaða játtanin á kr. 72.917.000,- verður fíggjað sum útlegg.
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men tó at punkt 4 verður tikið burturúr, og at samlaða játtanin verður reguleráð samsvarandi.

**Tekniska nevnd 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir ið málinum.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, trimum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Málið soleiðis samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Málið samtykt við aðru viðgerð við níggju atkvøðum fyri, fýra ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Anja Hartmann Wardum, Turid Horn og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Fjarhitafelagið hevur í løtuni ikki umstøður til at leggja fjarhitaleiðingar í vinnuútstykkingina og til stórhøllina við Tjarnir. Hetta merkir, at um fjarhitaleiðingar skulu leggjast, verður neyðugt at fáa til vega áleið 9 mió. kr. til prosjektering, keyp av tilfari, grevstur vm.

Í sambandi við verkætlanina at leggja fjarhitaleiðingar frá á Hjalla til vinnustykkini og stórhøllina við Tjarnir verður neyðugt at heimila umsitingini at samráðast við Fjarhitafelagið um tær kommunalu leiðingarnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at:
- játtaðar verða 9 mió. kr. av kontu 6975 Byggibúning ídnaðarøki (íløgur) inn á konto 6975, L69004 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla,
- heimila umsitingini at samráðast við Fjarhitafelagið at leggja aftur fyri nevnd,
- og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undr við teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 168 |
| | Formansins merki: |

# 41/24 Broyting av almennu byggisamtyktini, matr. nr. 1156, 1157 og 1160a, Tórshavn. Frá 4. grundumráði til D2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 52/24 | 24/00237-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 41/24 | 24/00237-1 |

**Upprunin til málið**
Føroya Ríðingarfelag hevur sent umsókn um nýggja kappríðingarbreyt í Havnardali. Í sama haga, beint norðan fyri ríðihøllina, bygdi Føroyska Íslandsrossafelagið í 2023 nýggja ríðibreyt. Hetta málið snýr seg um at broyta byggisamtyktina fyri 69.876 $m^2$ í økinum, soleiðis at galdandi byggisamtykt samsvarar við virksemið.

**Lýsing av málinum**
Ynskið er at betra og savna virksemið fyri ríðingarfeløg í Havnardali. Sambært uppskotinum, skal nýggja breytin byggjast í leinging av verandi breytum og fer tvørtur um Tvørá, umframt part av matrikul 1156, 1156 og Flatnahaga (matr.nr. 1160). Uppskotið snýr seg um at broyta almennu byggisamtyktina fyri nýggja økið frá 4. grundumráði, soleiðis at alt økið verður D2 øki, ætlað ítrótt og tænastuvirksemi. Eisini verður partur av matr.nr. 1157, har nýggja ríðibreytin skal byggjast, broyttur frá D1 øki til D2. Av tí at virksemið hjá Føroyskt Íslandsrossafelag er í grannalagnum, og nýggja ríðibreytin hjá felagnum lat upp í 2023, partvíst í 4. grundumráði, so ber til at víðka D2 øki, soleiðis at tað fevnir um alt rossavirksemið í Havnardali.

**Lógir, ásetingar o.a.**

*Ásetingar fyri umráðispart D1 í 3. grundumráði*
1 Umráðisparturin verður lagdur til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál.

2 Bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

*Ásetingar fyri umráðispart D2 í 3. grundumráði:*
1 Umráðisparturin verður lagdur til ítrótt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hendan.

2 Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt fyri eitt natúrligt avmarkað øki.

3 Byggistigið skal, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, ikki fara upp um 0,25.

4 Nýtslustigið skal, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, ikki fara upp um 0,5.

*Ásetingar fyri 4. grundumráði eru m.a.:*
1 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

2 Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.

3 Hús og onnur bygging skulu vera soleiðis vorðin og sett soleiðis í landslagið, at tey lýta sum minst.

4 Í sambandi við bygging í 4. grundumráði treytar kommunan sær rætt at seta krøv til skap og staðseting.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Ríðibreyt í Havnardali, Føroya Ríðingarfelag,* journal nr. 23/06151
- *Føroya Ríðingarfelag : Umsókn um trøðna matr. nr 1156, Tórshavn,* journal nr. 18/01264
- *Føroyskt Íslandsrossafelag: Umsókn um víðkan av øki felagsins við Kráarheygg í Havnardali (2006-0321),* journal nr. 17/02798

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Áðrenn broyting,* journal nr. 24/00237-2
- *Eftir broyting, journal nr.* 24/00237-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta almennu byggisamtyktina fyri økið sambært kortskjali *Eftir broyting* og beina málið í býráðið, treytað av neyðugum loyvum frá friðingar-myndugleikum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

## 42/24 LV mál nr. 21/01631 (VS: mál nr. 16/00514 Viðv. leigusáttmálanum á matr. nr. 1e og 1f á Sundi)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 18.01.2022 | 2/22 | 21/03297-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 52/22 | 21/03297-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 48/22 | 21/03297-2 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.05.2022 | 21/22 | 21/03297-2 |
| 5 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 176/23 | 21/03297-2 |
| 6 Havnanevndin | 07.02.2024 | 4/24 | 21/03297-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 33/24 | 21/03297-2 |
| 8 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 42/24 | 21/03297-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Landsverk um at leingja leigusáttmálan undir asfaltverkinum á Sundi við 25 árum.

**Lýsing av málinum**
Í 2004 gjørdi Tórshavnar kommuna sáttmála um at leiga matr. nr. 1f til P/F Asfaltverkið á Sundi. Í 2011 verður leigumálið vaksið, til eisini at umfata matr. nr. 1e. Leigumálið er galdandi til 1. juli 2024, tá tað kann sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða freist.

Í 2016 framleigar P/F Asfaltverkið økið til Landsverk, við somu rættindum og skyldum, sum leigarin hevur sambært leigusáttmálanum við Tórshavnar kommunu.

**Landsverk sigur m.a. soleiðis í síni lýsing av verkinum:**
Staðsetingin á Sundi er munandi betri viðvíkjandi veðri, og tað krevur minni orku at koma til og frá við tilfari til verkið, enn um koyrast skal í Hundsarabotn.

Tá asfaltverkið á Sundi er liðugt útbygt í 2022, verður tað at sammeta við eitt nýtt verk, men longu nú er stórur partur av dagføringunum framdar.

Asfaltverkið kann í 2022 framleiða 200 tons um tíman, og arbeiðir tí effektivari, og koyrir færri tímar um árið enn higartil.
Larmurin frá verkinum lýkur galdandi ES krøv, men um samanborið verður við aðrar larmkeldur í økinum, so sum landsveg og skip við bryggju, gevur verkið sera lítið av larmi frá sær.

Umhvørvisgóðkenningin setur strong krøv til verkið, sum øll verða lokin. Onki verður latið á sjógv frá verkinum.

Útlátið úr skorsteininum er nærum 100% dampur, meðan alt annað útlát, so sum co2, nox og sox lýkur strangastu útlátskrøv. Samanborið við oljufýringar hjá húsarhaldinum er roykurin frá asfaltverkinum munandi reinari.

Bitumen, sum er 5% av asfaltinum er bólkað í 2B, sum viðgerð evni í møguliga eru krabbameinselvandi fyri menniskju. Í bólki 2B eru eitt nú fartelefonir og kaffi, so talan er ikki um eitt evni, sum verður katagoriserað sum vandamikið.

Samanumtikið er asfaltverkið hjá Landsverk á Sundi eitt nýmótans verk, sum lýkur øll umhvørviskrøv – bæði í Danmark og í Føroyum.

Ætlanin er, í mestan mun, at brúka føroyskt tilfar.

**Luftgóðskumátistøð í Kaldbak:**
Ein luftgóðskumátistøð hevur staðið í Kaldbak síðani 2019. Mátingarnar vísa, tað er onki dálkingarevni, sum fer uppum markvirðini í ES nakað ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Bæði leigari og útleigari hava hildið sínar skyldur í leigusáttmálanum.

Um leigumálið verður uppsagt, skal økið ruddast og latast aftur í sama standi, sum tá leigumálið byrjaði.

Grein 3 í leigusáttmálanum er soljóðandi:
*Leigumálið er galdandi til 1.juli 2024. Aftaná hetta kann leigumálið av báðum pørtum sigast upp við 6 mánaða freist til at halda uppat tann 1. Í einum mánaða.*

*Vil leigarin halda áfram við leigumálinum, aftaná at tað ásetta áramálið er útgingið, skal leigarin hava fyrsta rætt til at gera nýtt leigumál, um Tórshavnar kommuna loyvir hesum, og um kommunan ikki sjálv nýtir rættin til at taka økið í nýtslu til egið brúk.*

Tá Tórshavnar kommuna ikki hevur boðað frá nøkrum ætlanum at taka økið til egið brúk, leigarin hevur yvirhildið ásetingarnar í leigusáttmálanum og stórar íløgur eru gjørdar í at uppstiga asfaltverkið, skulu týðandi grundgevingar liggja fyri ikki at leingja leigumálið.

Leigan verður sambært galdandi leigugjøldum fyri havnaøkir í Tórshavnar kommunu.

Mótmælisskriv móti bygging av asfaltverkið er komið frá fólki úr Kaldbak.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mótmæli úr Kaldbak um asfaltverk j.nr 20/00731-44

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | X | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at ganga umsóknini á møti, at leingja leigumálið við 25 árum.

Tilmælið kann fáa fíggjarligar avleiðingar fyri Landsverk við at kostnaðurin á orku kann broytast og kann møguliga óbeinleiðis fáa fíggjarligar avleiðingar fyri kostnaðin á asfalti.

**Havnanevndin 18. januar 2022:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein samtykti at leingja leigumálið við 25 árum, treytað av, at Asfaltverkið hevur lagt um til til biogass – og í øðrum lagi til gass (natúrgass) í seinasta lagi 1. juli 2024 og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Birgir Nielsen og Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til nýggja staðseting.
**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini og beinir málið í býraðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til nýggja staðseting.
**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
17. juni 2021 fekk Tórshavnar býráð mótmælisskriv um asfaltverkið á Sundi frá Kaldbaksfólki og øðrum í nærumhvørvinum. Í mótmælisskrivinum verður gjørt vart við ótryggleika um staðsetingina av asfaltverkinum í mun til dálking frá verkinum og møguligar heilsuváðar av hesum. Gjørt verður vart við, at fólk av somu orsøk aftra seg við at seta búgv í Kaldbak. Eisini verður spurningur settur við tær mátingar, sum higartil eru gjørdar av útlátinum frá asfaltverkinum.

Umhvørvisdeildin undir Teknisku fyrisiting hjá Tórshavnar kommunu hevði 20. apríl fund við umboð fyri Landsverk (LV) um verkið og viðger herundir fylgjandi spurningar:

- hvørjar hugsandi staðsetingar kundu verið av slíkum asfaltverki,
- hvør av hesum staðsetingum er mest skynsom grundað á eina samlaða meting,
- hvørjar treytir kann tað vera viðkomandi at seta ísv. leingjan av sáttmálanum.

Verandi leigusáttmáli kann í ávísan mun tulkast at binda kommununa til at leingja sáttmálan, um kommunan ikki sjálv skal brúka økið til annað endamál, ella um ikki serliga tyngjandi viðurskifti tala ímóti tí – og/ella tala fyri aðrari staðseting. Kommunan hevur, sum er, ikki aðrar ætlanir við verandi øki á Sundi. Við atliti at ótryggleikanum hjá borgarunum í nærumhvørvinum er tað hinvegin skynsamt at viðgera møguligar alternativar staðsetingar. Neyvan eru heldur nakrar løgfrøðiligar forðingar fyri at seta nýggj, tíðarhóskandi krøv til rakstur av og dálking frá verkinum. LV upplýsir, at verkið koyrir so at siga hvønn gerandisdag í árinum. LV hevur longu gjørt stórar íløgur í ábøtur á verkið, og Løgtingið hevur uppskot til viðgerðar av uppaftur størri íløgu fyri yvir 10 mió. kr. Áðrenn tað verður gjørt, er neyðugt at taka endaliga støðu til, um verandi asfaltverk skal takast niður og flytast, ella heilt nýtt verk byggjast aðrastaðni.

**Hundsarabotnur, Signabøur og Gamlarætt**
Áðrenn asfaltverk varð bygt á Sundi, varð alt tilfar, sum ikki varð útvunnið á staðnum, flutt niðan í Hundsarabotn og haðani út um landið. Staðfest er tó, at skervur av føroyskum gróti slítist og morlast ov skjótt og er tí ikki egnaður til asfaltering, og verður skervur til asfaltering tí í dag yvirhøvur innfluttur. Í mun til at asfaltverkið er staðsett við eitt havnarøki, hevði tað, at koyrt skerv, bitumen og annað tilfar niðan í Hundsarabotn fyri síðan at flyta tað út um landið, elvt til eyka koyring og við hesum eyka ferðslu, slit, útlát av veðurlagsgassum og aðra eyka dálking. Varð asfaltverkið lagt ísv. havnarøkið á Signabø, høvdu fleiri íbúgvar búð tættari við verkið og verið órógvaðir av møguligari dálking, óljóði og øðrum, enn staðsetingin á Sundi elvir til. Á Gomlurætt er ov lítið pláss til slíkt virksemi, eisini um alivirksemi og Sandoyartunnilin ikki vóru farin við einum parti av lendinum har.

**Glyvursnes**
Tórshavnar kommuna hevur aðrar ætlanir við grótbrotinum á Glyvursnesi. Skuldi Glyvursnes hóast hetta verið umhugsað, er neyðugt, at lendingarviðurskiftini eru nóg støðug til slíkt virksemi. Óheft av hesum hevði staðseting á Glyvursnesi elvt til meiri koyring enn av Sundi. Vegurin av Argjahamri út á Glyvursnes hevði kravt stórar ábøtur, og koyringin millum asfaltverk og endaligu nýtslustøðini hevði verið longri, elvt

til hægri orkunýtslu, meiri dálking og útlát av vakstrarhúsgassum og hevði órógvað ferðsluna í Tórshavn munandi meiri enn staðseting á Sundi.

**Møguligar aðrar staðsetingar**
Í prinsippinum kundi asfaltverkið verið flutt til eina aðra havn uttan fyri Tórshavnar kommunu. Tó er Tórshavnar kommuna, umframt Landsverk sjálvt, størsti einstaki brúkari av asfalti í landinum við um 10-15.000 tonsum av vanligu framleiðsluni á 30-50.000 tonsum árliga. Tí hevði staðseting aðrastaðni í landinum mest sannlíkt elvt til meiri flutning, størri útlát av vakstrarhúsgassum og aðra dálking. Sannlíkt hevði onnur staðseting eisini havt neiliga ávirkan á fleiri borgarar í nærumhvørvinum av verkinum, umframt av eyka koyring í bygdum øki.

Av teimum møguleikum, sum her eru viðgjørdir, tykist staðsetingin á Sundi at vera eina frægast, praktiskt, fíggjarliga og umhvørvisliga.

**Burðardygt asfalt?**
Kann asfaltverkið so við verandi staðseting gerast meiri burðardygt og dálka minni? Eyðsæð kann tað vera torført at gera eitt asfaltverk burðardygt. Umframt umhvørvislig atlit snýr burðardyggleiki seg eisini um sosial og fíggjarlig viðurskifti í breiðum týdningi.

**Altjóða viðurkend krøv**
Í mótmælisskrivinum til Tórshavnar kommunu verður ivi sáddur um, hvørt mátingar av útlátum frá asfaltverkinum higartil eru framdar á mest umboðandi støðum. Fyri at tryggja, at borgarin kann kenna seg tryggan, er skilagott at tryggja, at tað lýkur altjóða og norðurlendsk krøv og viðurkendar framferðarhættir, eitt nú um innaneftirlit, mátingar av útláti, sertifisering, og um alsamt at nýta besta tøka tøkni og framferðarhættir (BAT).

**Frá olju til varandi orku og orkusparandi átøk**
Við fyrivarni fyri hesum benda tøku upplýsingarnar tó á, at høvuðsampin og størsta útlátið av asfaltverkinum stendst av roykinum frá, at brenniolja verður nýtt til at turka og hita skerv og bitumen. Sum skilst er stórur partur av orkunýtsluni farin til at turka og síðani hita skerv, bitumen og annað tilfar. Fyri at minka um orkunýtsluna eigur skervur og annað tilfar tí í mest møguligan mun at verða vart ímóti vætu, soleiðis at orkunýtslan í hesum sambandi verður minst møgulig. Sum skilst, eru átøk hesum viðvíkjandi sett í verk ella eru við at verða sett í verk, sum longu hava minkað nógv um orkunýtsluna.

Eisini eigur at verða miðað eftir, at framleitt og útlagt asfalt heldur longst møguligt, so minni skal framleiðast. Sum kunnugt er føroyskur skervur ikki egnaður til asfalt. Tí verður slitsterkari skervur innfluttur, og er hetta hóast flutningin tvørtur um hav nógv burðardyggari enn at nýta lokalan skerv. At nýta skerv, sum tolir mest møguligt slit, minkar í sjálvum sær um nýtsluna og tí eisini um rakstrartíðina hjá verkinum, og tí um dálking og ampar av verkinum.

Hinvegin skerst ikki burtur, at asfaltverkið nýtir stórar mongdir av olju sum orku, sum umframt at dálka, útleiðir stórar mongdir av vakstrarhúsgassum. Tí hevði verið skynsamt at skift orkunýtsluna til varandi orkukeldur. Hetta má gerast á ein hátt, sum hóast alt tryggjar virkisførið hjá verkinum, um og tá varandi orkukeldur stundum ikki eru tøkar. Treyt um at skifta til varandi orku eigur tó ikki at læsa partarnar til ávísa orkukeldu ella tøkni, tí rætta loysn í ár kann vera skeiva loysn næsta ár og kanska serliga longri fram í tíðina.

Ampar hava verið av lukti. Sambært LV kennast hesir mest tá asfaltið verður blandað, og tá asfaltið verður stoytt í lastbilarnar. Ætlanir eru um, at hetta í framtíðini skal fara fram undir yvirdekningi ella inni, so slíkir ampar kunnu minkast.

**Tíðarfreist**
Tíðarfreistin 1. juli 2024 at skifta til varandi orku, ið verður skotin upp av Havnanevndini, kann sambært LV gerast í so tepur; fyri at finna røttu loysnir krevjast kanningar, fyrireiking, bíleggingartíð og tíð til at fremja

sjálvt arbeiðið. Tí kann mælast til, at skiftið skal gerast skjótast gjørligt, men at seinasta freist verður ásett eitt vet seinni.

Teknisk fyrisiting hevur á fundi við umboð fyri LV 20.04.2022 avtalað at samstarva um at kanna, hvat ið krevst fyri møguliga at kunna endurnýta asfalt, soleiðis at sleppast kann undan at tyrva tað, og at samstarva um hetta, skuldi tað víst seg møguligt. Tað skulu ávísar mongdir til, og sleppast skal í størst møguligan mun undan at leggja asfalt til endurnýtslu á goymslu, tí tað tá hevur lyndi at klumpa seg saman og gerast gróthart, so tað nærum ikki fæst út aftur. Tí er neyðugt at fáa allar kommunur og viðkomandi aktørar í landinum við til at nýta av endurnýtta asfaltinum, so hvørt tað kemur inn og verður viðgjørt.

**Útsjónd**
Neyvan prýðir eitt asfaltverk nærumhvørvið. Á Sundi liggur tað tó í einum havnarøki við tí virksemi, sum nú eina ferð hoyrir til. Men sjálvt fyri eitt havnarøki kann asfaltverkið og kringøkið undir seinastu eigarunum neyvan sigast at hava verið nakað prýði. Seinnu tíðina er hetta nógv bøtt. Fyri at asfaltverkið eisini frameftir skal skemma minst møguligt, kann mælast til, at tað í mestan mun, tó innnan rímilig mørk, verður roynt at minka um tess sjónligu árin á nærumhvørvið. Tað kundi t.d. snúð seg um viðlíkahald í tøkum tíma. Kommunan eigur lendið omanfyri og á síðunum, har kommunan, møguliga við fígging frá Tórshavnar Havn og av stuðulsjáttan hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til gróðurseting av trøum kundi plantað trø og runnar, eisini fyri á tann hátt at binda $CO_2$ og samstundis gera verkið minni sjónligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Umhvørvisdeildini mæla til, at:

- Leigusáttmálin við Landsverk um asfaltverkið á Sundi verður longdur, treytað av støðugum átøkum fyri at minka um ampar av asfaltverkinum av óljóði, dálking og útláti av vakstrarhúsgassum, viðlíkahaldi, útsjónd og líknandi viðurskiftum,
- Landsverk alsamt viðlíkaheldur og tryggjar eitt virkið innaneftirlit og alsamt stýrir og hevur eftirlit við framleiðslu, árini og frávikum, og at skoðað verður eftir altjóða viðurkendum standardum, t.d. ISO14000,
- Landsverk umbiður endurskoðan av, um mátingar, mátingarhættir, og hvar ið mátað verður, er so skynsamt sum gjørligt í mun til landslagið, og hvussu luftin og harvið luftdálking ferðast á fjørðinum,
- Landsverk í árligari frágreiðing greinar nýggj ella bøtt átøk hesum viðvíkjandi,
- Allar orkukeldur hjá verkinum skjótast gjørligt, um til ber longu í 2024 og í seinasta lagi innan árslok 2025, verða frá varandi orkukeldum, tó á ein hátt, ið tryggjar verkinum fult virkisføri, um ella tá varandi orka stundum ikki er tøk,
- Skervur og annað tilfar í størst møguligan mun verður vart ímóti vætu,
- Tórshavnar kommuna og Landsverk saman við Kommunufelagnum greina møguleikar og krøv til at endurnýta asfalt og um gjørligt taka ítøkilig stig til hetta,
- Tórshavnar kommuna, umvegis Tórshavnar Havn, umhugsar at taka kostnaðin av ella at vera partur av tí at gera møguliga gróðurseting oman fyri verkið,
- Leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. mai 2022:** Málið varð umrøtt.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Málið beint í havnanevndina.

**Ískoyti**
Landsverk hevur latið Tórshavnar havn frágreiðing, dagfest 18.januar 2024, j.nr. 21/03297-31, um framtíðarætlanir fyri umhvørvisviðurskiftini á Asfaltverkinum á Sundi.
Í frágreiðingini vísir Landsverk á, at verkið er umhvørvisgóðkent í 2005 og at góðkenningin í løtuni verður dagførd saman við umhvørvisstovuni.
Landsverk greiðir frá, at fleiri umhvørvistiltøk eru gjørd á Asfaltverkinum, og verða tey eftirmett árliga. Innan orkuviðurskifti eru gjørd fleiri átøk, ið skulu avmarka orkunýtsluna, og serliga nýtsluna av olju. Átøk eru eisini framd, ið skulu fyribyrgja dálking av dusti og øðrum dálkingarevnum.
Viðvíkjandi framtíðarætlanum greiðir Landsverk frá, at ætlanin er at halda áfram at minka um orkutørvin, elektrifisera meira og at kanna aðrar varandi orkukeldur. Ein fortreyt fyri hesum er tó (orku) infrakervi í økinum. Landsverk greiðir frá, at Asfaltverkið í dag brúkar diesel at hita skervin upp við. Orkutørvurin til

upphiting er 16,8 MW, ið harumframt varierar nógv innan stutt tíðarbil. Slík orkunøgd er torfør at framleiða við elorku. Asfaltídnaðurin hevur av og á kannað møguleikan fyri at brúka el sum orkukeldu, men enn eru tekniskar loysnir til hetta ikki komnar á marknaðin. Landsverk fylgir tó við í menningini í grannalondunum, og alt eftir hvussu tøknin mennist, er ætlanin at tillaga framleiðsluna samsvarandi.
Landsverk/Asfaltverkið arbeiðir harumframt við at minka um óljóð, eitt nú við at fáa fleiri partar av verkinum undir tak.

**Tilmæli**
Vísandi til málslýsingina til fundin í havnanevndini 18. januar 2022, umframt frágreiðing frá Landsverk dagfest 18. januar 2024, mælir stjórin í Tórshavnar havn til, at leigusáttmálin við Landsverk um grundøkið undir Asfaltverkinum (matr. 1e og 1f á Sundi) verður longdur við 25 árum.

**Havnanevndin 07. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen, Bjørg Dam, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddu: Turið Horn, Jón Kragesteen og Annika Olsen.

| | Býráðsfundur<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 176<br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 43/24 Verjugarður við Vónina - broyting

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 07.02.2024 | 8/24 | 24/00634-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 34/24 | 24/00634-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 43/24 | 24/00634-1 |

**Upprunin til málið**
Eftir áheitan frá Rescue Lív, hevur havnanevndarformaðurin biðið um at fáa málið á skrá.

**Lýsing av málinum**
Rescue Lív hevur gjørt vart við, at tað er heldur trongligt at sigla inn/út úr teirra atløguplássi í bátahylinum í Álakeri. Frástøðan frá horninum á verjugarðinum við Vónina og til armarnar á nærmastu bátabrúnni er sambært Rescue Lív heldur lítil og tí eru teir ótryggir at sigla út og inn.

Tórshavnar havn hevur gjørt projektuppskot um at taka burtur hornið á verjugarðinum, og hevur biðið um undirhondsboð uppá arbeiðið. Sp/f Andrias Berg hevði lægsta boð áljóðandi 366.000 kr.
Umframt tilboðsupphæddina má nakað setast av til ókendar útreiðslur og møguligar nøgdarreguleringar, í hesum føri mett til kr. 134.000.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til:
- At taka av tilboðnum frá Sp/f Andrias Berg áljóðandi kr 366.000.
- At játta kr. 500.000 av íløgukarminum fyri 2024 til smábátahavnir.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 07. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 44/24 Leigusáttmáli Smyril Line

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 22.06.2021 | 28/21 | 21/02574-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 170/21 | 21/02574-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 164/21 | 21/02574-1 |
| 4 Havnanevndin | 14.06.2022 | 18/22 | 21/02574-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 189/22 | 21/02574-1 |
| 6 Havnanevndin | 27.02.2024 | 11/24 | 21/02574-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 57/24 | 21/02574-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 44/24 | 21/02574-1 |

**Upprunin til málið**
At skipa havnarøkið og at betra um umstøðurnar hjá ferðafólki og frakt á Eystara havnarøki, nú tað nærkast at nýggja havnarlagið verður tikið í brúk.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar havn er eigari av verandi farstøð og tilhoyrandi trapputorni.

Tá gamla Norrøna byrjaði siglingina upp á Tórshavn fyrst í 80-árunum, vóru tillagingar gjørdar á farstøðina, sum Strandferðslan brúkti til Smyril.

Tá nýggja Norrøna kom í 2003, bleiv trapputornið bygt afturat gomlu farstøðini, men umstøðurnar til bilar og ferðafólk vóru at kalla tær somu.

Í sambandi við, at verandi Norrøna kom í 2003, bygdi Smyril Line afturat einum pakkhúsi hjá Tórshavnar havn

Síðani Norrøna byrjaði sigling, er ferðafólkatalið og fraktnøgdirnar nógv vaksnar, uttan at umstøðurnar á landi hava fylgt við.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar havn hevur tørv á einum nýggjum terminali til ferðafólk, og Smyril Line hevur tørv á nýggjum pakkhúsi við tilhoyrandi skrivstovum.

Partarnir eru samdir um, at ein góð loysn er at gera ein felags bygning, sum rúmar goymslu- og skrivstovuhølum til Smyril Line, og ferðafólkaterminal til Tórshavnar havn.

Áðrenn bygt verður, skulu partarnir vera samdir um verkætlanina.

Endaligi kostnaðurin verður fastlagdur, tá tilboðini upp á byggingina eru komin inn.

Uppskot er gjørt til avtalu og sáttmála j. nr.

Væntandi verður meginparturin av keypinum fíggjaður við lántøku.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin og kommunustjórin mæla til at taka undir við avtalu og sáttmála j.nr. 21/02574-2 og 21/02574-5.

**Havnanevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti (Juni 2022):**
Smyril Line hevur arbeitt víðari við at fyrireika felags bygningin. Tekningar v.m. eru nakað broyttar í mun til fyrsta uppskotið, eins og kostnaðarstøði er hækkað.
Í hesum uppskotið er Terminalurin nú áleigis 2000 m2 og kostnaðarmetingin fyri partin hjá Tórshavnar havn (Terminal) er tískil dagførd og er nú áljóðandi 68,0 mió. kr (J.nr. 21/02574-10).

Sambært avtaluni skulu báðir partar vera samdir um verkætlanina áðrenn bygt verður, herundir eisini kostnaðarmetingina. Tískil er neyðugt, at Tórshavnar havn gevur Smyril Line tilsøgn um, at tikið verður undir við dagførdu kostnaðarmetingini, soleiðis at Smyril Line kann halda áfram við projekteringini, herundir at gera myndugleikaprojekt og høvuðsprojekt, og at bjóða arbeiðið út.

Endaligi kostnaðurin verður fastlagdur, tá ið tilboðini eru komin inn.

Sambært upplýstu tíðarætlanini verður høvuðsprojektið liðugt tíðliga í oktober 2022 og licitatiónin tíðliga í november 2022.

**Tilmæli**
Havnarmeistarin mælir til at Smyril Line kann halda áfram við projekteringini og bjóða arbeiðið út sambært hesum uppskotið.

**Havnanevndin 14. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Samtykt at taka undir við havnanevndini.

**Ískoyti (februar 2024):**
Smyril Line hevur gjørt lidna byggiætlan við tekningum og kostnaðarmeting. Smyril Line hevur fingið tilboð upp á arbeiðið frá P/F Articon, og hevur síðani samráðst við arbeiðstakaran um tillagingar av tilboðnum.

Samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina, herundir arbeiðstakaraútreiðslur, projektering og eftirlit, óvæntað og rentukostnaður, er býttur millum partarnar í mun til bygnings- og økispartarnar, sum hvør partur eigur.

Kostnaðurin hjá Tórshavnar havn verður sambært verkætlanini hesin:

| | | |
|---|---|---|
| Arbeiðstakaraútreiðslur | 110.941.051,58 kr | 110.941.051,58 kr |
| *Terminalur* | *69.551.470,82 kr* | |
| *Landgongd* | *16.832.161,52 kr* | |
| *Uttanumøkið* | *16.268.071,76 kr* | |
| *Tollbygningur* | *8.289.347,48 kr* | |
| Projektering | | 6.276.905,65 kr |
| Uppfylging og fakeftirlit | | 2.449.510,28 kr |
| Óvæntað | | 11.966.746,75 kr |
| Rentukostnaður | | 8.161.321,28 kr |
| **Samlaður kostnaður (TH)** | | **139.795.535,55 kr** |

Tórshavnar havn hevur samskift við Smyril Line um verkætlanina. Niðurstøðan er, at Tórshavnar havn tekur undir við fyriliggjandi verkætlan fyri terminalin og tollbygningin, men at smávegis tillagingar skulu gerast við uttanumøkið og landgongdina. Í verkætlanini er ikki íroknað niðurtøka av svarta pakkhúsinum, sum verður neyðugt fyri at kunna gera uttanumøkið. Harumframt skal gerast ein nýggjur stormpullartur í staðin fyri ein stormpullart, sum má takast niður.

Á fíggjarætlanini hjá Tórshavnar havn eru higartil avsettar 40 mió.kr. á P41 «Farstøð á molanum» og 10 mió.kr. á P38 «Skipan av havnaøkinum».

Sambært fíggingarætlanini fyri verkætlanina skal Tórshavnar havn rinda Smyril Line fyrsta gjaldið áljóðandi 26,3 mió.kr., ið svarar til 20 % av byggiútreiðslunum, tá ið sáttmálin við arbeiðstakaran verður undirskrivaður, og restina tá ið byggingin verður avhendað. Hetta gjaldið (26,3 mió.kr.) kann Tórshavnar havn fíggja av tøkum peningi, meðan restin av kostnaðinum má fíggjast við lántøku, sum áður lýst.

Uppskot til samognarsáttmála partanna millum viðvíkjandi bygninginum «Molanum» er í gerð, J.nr. 21/02574-20.

**Skjøl:**
J.nr. 21/02574-17: Molin – Yvirlitstekningar
J.nr. 21/02574-17: Molin – Økisyvirlit
J.nr. 21/02574-18: Molin – uppfeiling av kostnaði
J.nr. 21/02574-18: Molin – fíggjarleistur.
J.nr. 21/02574-20: Molin – samognarsáttmáli

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til:

- At Smyril Line fær tilsøgn frá Tórshavnar havn um at byggiætlanin kann fremjast sambært fyriliggjandi verkætlan og tilboði, treytað av, at neyðugar tillagingar kunnu fremjast viðvíkjandi uttanumøkinum og landgongdini innanfyri fyriliggjandi kostnaðarmetng.
- At játtaðar verða 40 mió.kr. til verkætlanina av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2024, verkætlan P41 «Farstøð á molanum».
- At avseta og játta 50 mió. kr. til verkætlanina av Íløguætlanini hjá Tórshavnar havn fyri 2025, og 50 mió. kr. av Íløguætlanini hjá Tórshavnar havn fyri 2026.
- At taka undir við uppskoti til samognarsáttmála viðvíkjandi bygninginum «Molanum».
- At partarnir arbeiða víðari við at gera neyðugar tillagingar í.s.v. uttanumøki og landgongdina.
- At Tórshavnar havn fyrireikar verkætlanir fyri niðurtøku av svarta pakkhúsinum og gerð av nýggjum pullarti, og at játtað verður 1 mió.kr. av verkætlan P38 «Skipan av havnaøkinum» til hetta endamálið
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 27. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 45/24 Prísir á tyrvitilfari í sambandi við Nýggjheiðar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.02.2024 | 10/24 | 24/00785-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 32/24 | 24/00785-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.02.2024 | 56/24 | 24/00785-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 45/24 | 24/00785-1 |

**Upprunin til málið**
Nú Tórshavnar Kommuna og IRF hava gjørt avtalu um eitt móttøkupláss til tyrvitilfar og rottangaevju á Nýggjheiðum, mugu prísirnir tillagast *jnr 17/03122 Nýtt tyrvingarpláss : Samstarv við IRF*.

**Lýsing av málinum**
Tá Tórshavnar Kommuna og IRF gjørdu avtalu um nýtt móttøkupláss til tyrvitilfar og rottangaevju, *(sí jnr. 17/03122 Nýtt tyrvingarpláss : Samstarv við IRF)*, var greitt, at Tórshavnar Kommuna mátti hava somu prísir, og at Tórshavnar Kommuna og IRF skuldu verða samd um prísirnar.

Hetta er bert galdandi fyri Endurnýtsluplássið, tí allir okkara vinnukundar, sum koyra til beinleiðis tyrving, verða framyvir kundar hjá IRF.

Tað bleiv ein nevnd fyri Nýggjheiðar sett. Í henni vóru, fyri Tórshavnar Kommunu, John Erik Hansen, leiðari á Kommunalu Brennistøðini, og Mortan Simonsen, fíggjarfulltrúi á Teknisku fyrisiting. Alt tað, sum verður avgjørt í hesi nevnd og hevur við kostnað at gera, skal leggjast fyri náttúru- og umhvørvisnevndina og Fíggjarnevndina.

Nevndin hevði fund hósdagin tann 1/2-2024. Onnur umboð fyri IRF vóru eisini við, har tey framløgdu eina prísskrá og vørubólkar. Eisini varð roknskapurin framlagdur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá fyrisitingini**
Sambært galdandi prísskrá, sum er frá 15. mai 2012, eru prísirnir hesir á Endurnýtsluni:

| TYRVINGARPLÁSSIÐ | | |
|---|---|---|
| At tyrva – vanligt | 1,28 kr/kg | 240 kr/$m^3$ |
| At tyrva – asbest | 1,00 kr/kg | 240 kr/$m^3$ |
| At tyrva – betonslamm | 1,00 kr/kg | 240 kr/$m^3$ |
| At tyrva – asfalt | 0,50 kr/kg | 160 kr/$m^3$ |
| At tyrva – dálkað | 2,00 kr/kg | 600 kr/$m^3$ |
| | | |
| Tyrving | 1,40 kr/kg | 300 kr/$m^3$ |

Um vit hyggja at prísinum fyri kg, so síggja vit, at tað er áleið 10% dýrari at lata tyrvitilfar inn á Endurnýtsluni enn á tyrvingarplássinum. Hetta kemst av, at vit mugu tá flyta tilfarið av Endurnýtsluplássinum til tyrvingarplássið.

Nýggir prísir á Tyrvingarplássinum í Nýggjheiðum:

**VØRULISTI NÝGGJHEIÐAR**

| | |
|---|---|
| Tyrving blandað | 2,2 kr/kg |
| Tyrving asbest | 2,2 kr/kg |
| Tyrving gips | 2,2 kr/kg |
| Tyrving bjálving | 2,2 kr/kg |
| Tyrving tungt | 0,45 kr/kg |
| Tyrving dálkað | Meting* |
| Ilska | 0,45 kr/kg |
| Rottangaevja – rottangabilar | 5.600 kr/bil |
| Rottangaevja – slambilar | 0,50 kr/kg |

*) *Í hvørjum einstøkum føri verður kostnaðurin mettur eftir, um tilfarið skal tyrvast, brennast ella sendast til viðgerðar uttanlands.*
*Eisini verður mett um, hvussu nógv tað er dálkað, og nøgd.*

Her mugu leggjast 15% afturat prísinum, soleiðis at Tórshavnar Kommuna ikki kemur at rinda fyri vinnuna í sambandi við flutning frá Endurnýtsluplássinum á Hjalla til Nýggjheiðar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/03122 Nýtt tyrvingarpláss : Samstarv við IRF

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevnd um og myndugleikum)**

**Skjøl**
17/03122-50 Fundur nr. 8 - Nýggjheiðar.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til, at brúka somu prísáseting sum IRF, og harumframt leggja 15% omaná fyri koyring.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. februar 2024:** Ein meiriluti, Bjørg Dam, Súna Mørk, Gunvør Balle, Turið Horn, tekur undir við tilmælinum, og vilja hava eina eftirmeting í september.

Annfinn Brekkstein atkvøður blankt.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 28. februar 2024:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og fíggjarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>29. februar 2024 | Blað nr.: 185 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 46/24 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 47/24 | 24/00061-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 46/24 | 24/00061-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

# 47/24 Kunning/fráboðanir í 2024 til býráðið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 47/24 | 24/00058-1 |

Kunning/fráboðanir til býráðið 29.02.2024:

- Leigusáttmáli Havnar bóltfelag

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Kunnað varð um málið.

**FUNDURIN LOKIN KL. 18:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Jákup Dam | Annika Olsen | Birgir Nielsen |
| Súsanna Olsen | Turið Horn | Jón Kragesteen |
| | Birita Baldvinsdóttir Iversen | |